2018

Fíggjarmálaráðið

# Búskaparfrágreiðing II

## Fíggjarlógaruppskotið 2018

September 2017

FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
MINISTRY OF FINANCE

# Innihald

Fororð ....................................................................................................................3
Inngangur ...............................................................................................................5
Lýsing av gongdini í búskapinum ...........................................................................7
Almenn fíggjarmál ..................................................................................................23
Uppskotið til fíggjarlóg fyri 2018..........................................................................27
Inntøkur landskassans í 2018 ..................................................................................28
Útreiðslur landskassans í 2018..............................................................................29
Løgur í 2018 ..........................................................................................................30
Játtanareftirlit í fíggjarárinum 2017 .....................................................................32
Rakstrarjáttanareftirlit ............................................................................................35
§ 1 Løgtingið..........................................................................................................35
§ 2 Løgmansfyrisitingin..........................................................................................36
§ 3 Fíggjarmál .........................................................................................................37
§ 5 Fiskivinnumál....................................................................................................38
§ 7 Mentamál ..........................................................................................................39
§ 11 Heilsu- og innlendismál ...................................................................................41
§ 12 Almannamál .....................................................................................................42
§ 13 Uttanríkis- og vinnumál...................................................................................44
§ 17 Samferðslumál..................................................................................................45
§ 20 Inntøkur ............................................................................................................46
Løgujáttanareftirlit í fíggjarárinum 2017 ...............................................................48

## Fororð

Búskaparligt hásummar er í Føroyum. Men eftir summar kemur heyst og vetur, og tí er týðandi, at vit í hesum døgum brynja samfelagið til framtíðina – við átøkum, ið flyta okkum framá móti einum sjálvbjargnum, samhaldsføstum og tíðarhóskandi Føroyum – samstundis sum vit bjálva okkum búskaparliga.

Avlop landskassans væntast at gerast 408 mió. kr. í 2018. Hetta er størsta avlop hjá landinum í 16 ár.

Eftir 8 ár við halli hjá landinum, árini 2008-2015, er hall nú vent til munandi avlop, bæði í 2016, 2017 og 2018. Men tað er ikki bert fíggjarstøðan her og nú, ið er vorðin betri. Munandi fólkavøkstur, týðandi nýskipanir og lágur rakstrarvøkstur, saman við inntøkuvøkstri, stuðla undir, at búskaparliga haldførið yvir tíð eisini er vorið munandi betri.

## Búskaparligt hásummar

Búskaparvøksturin hevur seinnu árini verið 7-8% árliga. Útflutningurin av fiskavørum er vaksin 15% seinasta árið, og talið av løntakarum er vaksið út við 700 seinasta árið. Arbeiði er til nærum allar hendur, og er arbeiðsloysið nú bert góð 2%.

Landið hevur nú munandi avlop, og hjá kommununum gongur eisini væl. Bygnaðarliga úrslitið hjá almenna geiranum er tí vent frá nógvum árum við halli til eitt mett bygnaðarligt avlop á um 1% av BTÚ í 2017.

Føroyingar spara eisini upp sum ongantíð áður. Týðilig tekin eru um, at búskaparliga framgongdin als ikki er grundað á lántøku, eins og undanfarnir hákonjunkturar hava verið. Innlán hjá húsarhaldum og vinnu vaksa væl meira enn útlán.

Føroyska framleiðslan hevur ongantíð verið størri enn nú. Søguliga hevur føroyska framleiðslan ligið væl lægri enn í grannalondum okkara, men hetta er nú broytt. Bruttotjóðarúrtøka føroyinga er í ár mett til 18,8 milliardir krónur, ið samsvarar við um 370 tús. kr. fyri hvønn føroying. Harvið hava Føroyar fyri fyrstu ferð í nýggjari tíð framleiðslu fyri hvønn íbúgva, ið helst er hægri enn í okkara grannalondum, Íslandi og Danmark.

Búskaparliga hava vit helst ongantíð verið so sjálvbjargin sum nú.

Og vit hava eisini sett met í fólkatalinum, ið er farið uppum 50.000.  Vit eru vorðin um 1.700 fleiri eftir bert 3 árum.

## Góðar tíðir krevja truplar avgerðir

Truplar avgerðir skulu takast í góðum tíðum. Tí tað kann vera trupult at taka avgerð um at raðfesta framtíðina framum nútíðina.

Søguliga hevur verið freistandi hjá politisku skipanini at sett eyka ferð á búskapin í góðum tíðum. Hetta sóu vit árini undan fíggjarkreppuna frá 2004-2007, tá ið rakstrarútreiðslurnar vuksu millum 4 og 5% flestu árini, og í 2008, tá ið rakstrarútreiðslurnar vuksu væl omanfyri 10%. Hetta kann kosta samfelagnum nógv, tá ið tíðirnar venda og inntøkurnar minka. Hall landskassans frá 2008-2015 á samanlagt 3 milliardir krónur vísir hetta kanska betri enn nakað annað. Úrslitið er lántøka og meira skuld, ið nú skal rindast aftur.

## Bjálva búskapin til verri tíðir

Vit skulu hava ráð at reka vælferðarsamfelagið á minst sama støði sum í dag, tá ið búskaparligi veturin einaferð kemur. Tí er alneyðugt at halda aftur í rakstrarvøkstrinum nú, tá ið tíðirnar eru góðar.

Fíggjarlógaruppskotið fyri 2018 leggur – eins og fíggjarlógin fyri 2017 – stóran dent á lágan rakstrarvøkstur á bert 1,9%. Hetta enntá samstundis sum stórur fólkavøkstur er, ið eisini økir tørvin á almennum tænastum, til dømis skúla- og heilsuverk.

Búskaparliga framgongdin í dag er tengd at fleiri viðurskiftum. Serstakliga er talan um stóra framgongd innan alivinnuna og uppsjóvarvinnuna. Harafturat er stórur vøkstur í byggivinnuni, eins og framgongd er á fleiri øðrum økjum, eitt nú í ferðavinnuni.

Altjóða laksaprísurin er sera høgur, oljuprísurin lágur, rentustøðið søguliga lágt og uppsjóvarstovnarnir væl fyri. Um bert eitt ella fleiri av hesum viðurskiftum broytast, kann hetta ávirka okkara búskap skeiva vegin. Hetta setir eyka krøv til búskaparligt skynsemi í hesum døgum.

## Brynja samfelagið til framtíðina

Fíggjarlógaruppskotið fyri 2018 byggir á fíggjarligt varsemi við lágum rakstrarvøkstri og avlopi omanfyri 400 mió. kr., samstundis sum 2/3 av avlopinum verða brúktar til at minka nettoskuld landsins, meðan 1/3 av avlopinum verður flutt í Búskapargrunn Føroya.

Soleiðis bjálva vit okkara búskap, samstundis sum vit brynja Føroyar til framtíðina við átøkum, ið geva okkum størri sjálvbjargni, styrkt samhaldsfesti og eitt meiri tíðarhóskandi samfelag.

Kristina Háfoss

Kristina Háfoss
Landsstýriskvinna í fíggjarmálum

# Inngangur

Sambært § 9 í løgtingslóg nr. 42 frá 4. mai 2009 um landsins játtanarskipan skal landsstýrismaðurin í fíggjarmálum, samstundis sum fíggjarlógaruppskotið verður lagt fram, leggja fram frágreiðing (Búskaparfrágreiðing II), sum gjølligari lýsir og metir um innihaldið í fíggjarlógaruppskotinum og greiðir frá játtanareftirlitinum í fíggjarárinum. Hetta er triðja uppskot til fíggjarlóg, sum sitandi landsstýri leggur fyri Løgtingið.

Úrslitið hjá landinum í 2016 gjørdist eitt avlop á 158 mió. kr. Heldur verandi gongd fram, verður avlopið í 2017 munandi størri sammett við avlopið í 2016 og sannlíkt væl omanfyri 400 mió. kr. Sostatt hevur landskassin aftur avlop eftir fleiri ár við halli, sum eru fíggjað við lántøku.

Fíggjarpolitiska málið hjá landsstýrinum er, at landskassin hevur vaksandi avlop næstu árini. Á henda hátt verður betri fíggjarpolitiskt rásarúm at standa ímóti við í framtíðini. Stórt trýst verður á útreiðslurnar hjá landi og kommunum næstu árini, millum annað orsakað av broyttari fólkasamanseting. Eisini er greitt, at stóri búskaparvøksturin, sum vit hava sæð síðstu 4-5 árini, sannlíkt fer at minka til eina meiri vanliga gongd í búskapinum.

Framrokningar av inntøkum og útreiðslum í uppskotinum eru dagførdar og grundaðar á verandi lóggávu og bundnar raðfestingar. Inntøkurnar í uppskotinum til fíggjarlóg fyri 2018 eru framroknaðar við støði í søguligum tølum fyri inntøkur og annars við støði í fyritreytum og lóggávu, sum er galdandi í løtuni. Inntøkurnar eru framroknaðar við ársins prísum í 2018 og framroknaðar við føstum prísum árini 2019 og frameftir.

Stórur partur av inntøkunum í fíggjarlógini eru skattir og avgjøld, sum verða stýrd av búskaparligu sveiggjunum, sum eru í samfelagnum yvir tíð. Inntøkusíðan í fíggjarlógini er tí fyri stóran part grundað á metingar um gongdina í búskapinum í framtíðini. Til ber at gera forsagnir og at meta um búskaparvøkstur í nærmastu framtíð, men eingin kann spáa neyvt um búskaparvøkstur fleiri ár fram í tíðina. Tí skulu metingarnar av inntøkum landskassans í framtíðini lesast við fyrivarni.

Útreiðslusíðan er ikki eins torfør at meta um, av tí at størsti parturin av útreiðslunum er grundaður á politiskar raðfestingar av tænastum og veitingum, sum samtykt er, at almennu Føroyar skulu bjóða. Óvissan á útreiðslusíðuni snýr seg serliga um gongdina í rentum, gongdina í oljuprísum og um úrslitini av lønarsamráðingunum á almenna arbeiðsmarknaðinum.

Búskaparpolitiska avbjóðingin er, at tiltøk, sum minka hallið á fíggjarlógini, kunnu samstundis tálma eftirspurning og búskaparvøkstur og tí eisini ávirka inntøkur landskassans. Tiltøk, sum skerja útreiðslur landskassans, ella tiltøk, ið økja skatta- og avgjaldsinntøkurnar, ávirka í flestu førum eftirspurningin í samfelagnum og tí eisini í ávísan mun bæði búskaparvøkstur og inntøkur landskassans.

Sum grundarlag undir metingunum um búskaparvøkstur næstu árini verða brúkt søgulig tøl, vitan um búskapargongdina síðstu árini og vitan um gongdina innan ymisk tjóðarbúskaparlig vísitøl. Eisini verða metingar hjá Búskaparráðnum og ymiskum altjóða stovnum brúktar sum partur av grundarlagnum at meta um búskaparvøksturin og inntøkurnar hjá landinum næstu árini.

Eisini skal viðmerkjast, at í framrokningunum er lagt upp fyri serligum viðurskiftum í ávísum vinnugreinum, har ið umstøðurnar tala fyri tí. Í fyritreytunum fyri 2018 verður vøksturin í BTÚ mettur til 3-4% (ársins prísir). Metingin hjá Fíggjarmálaráðnum er grundað á eina varsemisreglu og á ta óvissu, sum er um gongdina næstu árini.

Óvissan stavar millum annað frá, at tað framvegis er heldur ógreitt, á hvønn hátt Stóra Bretland fer úr ES-samstarvinum og hvussu hetta fer at ávirka gongdina næstu árini bæði í Stóra Bretlandi og í Evropa. Verður talan um eina óskipaða tilgongd, har ið torført verður at fáa semjur í lag um skiftistíð, handilssáttmálar og annað búskaparligt samstarv, kann hetta ávirka gongdina næstu árini.

Skattir, ið eru grundaðir á inntøku og nýtslu, til dømis vanligur landsskattur og meirvirðisgjald, verða í fyritreytunum settir at fylgja á leið sama vøkstri sum BTÚ, ella um 3% í 2018 og árini eftir. Tó eru gjørdar serligar metingar út frá fyritreytunum fyri játtanina á teimum inntøkujáttanum, har tað verður mett neyðugt, og har, ið umstøðurnar tala fyri tí.

Til dømis eru lønarsáttmálar enn ikki gjørdir á almenna arbeiðsmarknaðinum frá 1. oktober 2017 og frameftir. Tí er lønarvøkstur ikki íroknaður hvørki á inntøku- ella útreiðslusíðuni. Fyritreytirnar fyri framskrivingunum av rentuútreiðslunum eru metta gongdin í landskassaskuldini og útlitini fyri rentugongdini komandi 1-2 árini.

Frágreiðingin er skipað soleiðis, at fyrst er stutt lýsing av gongdini í føroyska búskapinum og í altjóða búskapinum. Síðani er ein lýsing av fíggjarlógaruppskotinum fyri 2018. At enda er frágreiðing um játtanarligu støðuna í ár, samanlagt og fyri hvørja grein sær. Her eru bara tiknar við tær rakstrar-, løgu- og inntøkujáttanir, sum verða mettar at víkja frá upprunaligu játtanini, tá ið fíggjarárið endaliga er gjørt upp.

# Lýsing av gongdini í búskapinum

Stór framgongd er í løtuni í føroyska búskapinum. Framgongdin byrjaði av álvara í 2013, og hon hevur staðið við síðan. Metingar benda á, at framgongdin fer at standa við næstu 1-2 árini, tó at vøksturin sannlíkt fer at hæsa nakað av og leggja seg á eitt meiri vanligt støði. Á mynd 1 niðanfyri síggjast metingar av gongdini í bruttotjóðarúrtøkuni síðstu árini.

Sambært metingum hjá Búskaparráðnum og Hagstovuni hækkaði bruttotjóðarúrtøkan (BTÚ) í ársins prísum nærum 7% í 2016. BTÚ í ársins prísum er síðani mett at vaksa um 6% í 2017 og um 4% í 2018. Fíggjarmálaráðið roknar somuleiðis við, at BTÚ í ársins prísum fer at vaksa um 6% í ár og 3-4% í 2018.

Hetta er grundað á eina varsemisreglu og yvirhøvur á ta óvissu, sum knýtir seg at metingum og forsagnum um gongdina í framtíðini. Eins og greitt verður frá niðanfyri, eru fleiri óvissur um gongdina næstu árini, sum tala fyri, at ein varsemisregla eigur at verða nýtt í sambandi við forsagnir um gongdina næstu 1-2 árini.

Mynd 1

Bruttotjóðarúrtøka í ársins prísum, broyting í % um árið, 1999-2018




* Tølini fyri 2016 til 2018 eru forsagnir og skulu lesast við fyrivarni.
Kelda: Hagstovan og forsagnir frá Búskaparráðnum.

Óvissa er millum annað um, á hvønn hátt Stóra Bretland fer úr ES-samstarvinum. Lítil ivi tykist nú vera um, at Stóra Bretland fer heilt úr ES-samstarvinum næstu 1-2 árini. Í løtuni er tíðarætlanin, at Stóra Bretland fer úr ES-samstarvinum í mars mánaði 2019. Men kortini er ikki greitt, um nøkur skiftistíð verður ella hvørjar avtalur og sáttmálar vera galdandi millum Stóra Bretland og ES, til dømis um handilssamstarv, felagsmarknaðin, tolløki og annað búskaparligt samstarv.

Í løtuni er mest sannlíkt, at ein skiftistíð á tvey ár verður í sambandi við, at Stóra Bretland fer úr ES-samstarvinum. Í politisku skipanini í Stóra Bretlandi er kortini ikki semja um, hvørt ein skiftistíð eigur at vera, tá ið Stóra Bretland fer úr ES-samstarvinum, ella hvussu long skiftistíðin eigur at vera.

Fyri Føroyar verður millum annað viðkomandi, hvussu verður við avtalum, sum Stóra Bretland væntandi fer at gera við onnur lond innan fiskivinnu. Stóra Bretland er eisini sum kunnugt millum størstu útflutningsmarknaðirnar hjá føroysku fiskivinnuni, og nakað av aldum laksi er eisini útflutt

á bretska marknaðin síðstu árini. Fyrra hálvár 2017 fóru um 10% av samlaða føroyska útflutninginum á bretska marknaðin.

Verður talan um eina óskipaða tilgongd, har ið torført verður at semjast um handilssáttmálar og aðrar avtalur, er ikki óhugsandi, at hetta kann ávirka gongdina í øllum Evropa næstu árini og harvið eisini gongdina í Føroyum. Hóast hetta helst fyrst og fremst fer at skala vøksturin í Stóra Bretlandi og ES-londunum, ávirkast føroyski búskapurin eisini av tí, sum fer fram í londum, sum vit samstarva við og útflyta til.

*Búskapurin stimbraður av ymiskum viðurskiftum síðstu árini – fleiri teirra koma uttanífrá*

Fleiri viðurskifti hava stimbrað búskapin síðstu árini og hava verið viðvirkandi til stóru framgongdina í búskapinum. Millum annað kann nevnast føroyski fiskiskapurin eftir uppsjóvarfiski, sum er vaksin munandi, og tær íløgur, sum eru gjørdar í móttøkuorku og víðariframleiðslu á landi.

Harafturat kann nevnast góða gongdin í alivinnuni og at alivinnan eisini hevur gjørt stórar íløgur í framleiðsluorkuna á landi. Í triðja lagi kann nevnast, at land, kommunur og aðrar vinnufyritøkur hava gjørt fleiri stórar íløgur, sum hava stimbrað eftirspurningin í samfelagnum.

Handilstiltøkini sum Russland og ES hava sett í gildi hvør móti øðrum síðani 2014 hava eisini havt við sær, at føroyskar fyritøkur hava kunnað útflutt munandi meira á russiska marknaðin sammett við áður, og hetta hevur givið fyritøkum, sum útflyta fisk og aldan laks, møguleikar at útflyta á russiska marknaðin, sum tær ikki høvdu frammanundan. Føroyskar fyritøkur útflyta serstakliga aldan laks, makrel og sild til Russlands. Nevnast kann, at alifyritøkurnar fáa ein góðan prísfyrimun av at útflyta á russiska marknaðin, sum serstakliga eftirspyr dýran og stóran fisk, sum verður seldur fyri hægri prís sammett við aðrar marknaðir.

At enda er búskapurin framvegis stimbraður av søguliga lágum rentustøði og lágum oljuprísum. Oljuprísir vóru serstakliga lágir í 2014 og 2015, men eru síðani hækkaðir nakað aftur í 2016 og í 2017. Oljuprísirnir eru kortini væl undir prísunum, sum vóru í 2012 og 2013. Í løtuni eru ikki útlit til, at oljuprísir í bræði fara at hækka aftur til støðið, sum var í 2012 og 2013.

Í løtuni eru heldur ikki útlit til, at altjóða rentustøðið hækkar stórvegis næstu tíðina. Roknast kann framvegis við sera lágum rentum næstu 1-2 árini. Rentustøðið kann sjálvsagt hækka nakað úr verandi søguliga lága støði næstu 1-2 árini, men forsagnir benda ikki á, at rentustøðið fer at hækka serstakliga nógv.

Nevnast kann, at eftir aldarskiftið fyri 17 árum síðan var føroyska bruttotjóðarúrtøkan fyri hvønn íbúgva 20-25% lægri sammett við okkara grannalond, Danmark og Ísland. Stóri búskaparvøksturin, sum hevur verið í Føroyum eftir aldarskiftið, hevur havt við sær, at føroyska bruttotjóðarúrtøkan fyri hvønn íbúgva nú kann metast at vera á sama stigi sum í okkara grannalondum, Danmark og Íslandi. Føroyska bruttotjóðarúrtøkan er vaksin úr um 188 tús. kr. fyri hvønn íbúgva í ár 2000 til mettar um 370 tús. kr. fyri hvønn íbúgva í 2017. Hetta er á leið á sama stigi sum í okkara grannalondum Danmark og Íslandi.

*Tekin um fløskuhálsar og trot á arbeiðsmegi í pørtum av búskapinum*

Tekin og ábendingar síggjast um fløskuhálsar og trot á arbeiðsmegi, serstakliga innan byggivinnuna og aðrar handverksvinnur. Hetta er tekin um, at nógv byggivirksemi er í ávísum økjum í landinum. Byggivinnan er vaksin sera nógv síðstu 1-2 árini. Løntakaratalið í byggivinnuni er nú um 2.100 fólk, sum er á leið sama tal av løntakarum, sum var í byggivinnuni miðskeiðis í 2008, tá ið sera nógv virksemi eisini var í byggivinnuni.

Sambært Hagstovuni sigur bróðurparturin av virkjunum í byggivinnuni frá, at trot á arbeiðsmegi er størsta avmarkingin, sum forðar fyri at vaksa um framleiðsluna. Virkir í byggivinnuni svara sostatt í dag á sama hátt sum í 2007 og 2008 áðrenn fíggjarkreppuna, og tá ið nógv byggivirksemi eisini var, at størsta avmarkingin fyri at vaksa framleiðsluna er trot á arbeiðsmegi.

Í summum vinnugreinum, millum annað í byggivinnuni og í øðrum handverksvinnum, innflyta fyritøkur arbeiðsmegi fyri at hava møguleika at nøkta eftirspurninginum og fyri ikki at missa marknaðarpartar. Skrásetingar í skattaskipanini hjá TAKS av skattgjaldarum, sum eru fluttir til landið síðstu árini, benda kortini ikki á, at talið á útlendingum, sum arbeiða í Føroyum í styttri tíðarskeið, er vaksið serstakliga nógv síðstu árini.

Sum heild gagnar tað føroyska búskapinum, at fyritøkur kunnu innflyta arbeiðsmegi, tá ið tær hava tørv á hesum og tá ið torført er at fáa hendur á arbeiðsmegi. Hetta tekur nakað av trýstinum av arbeiðsmarknaðinum, tá ið nógv virksemi er, og minkar um vandan fyri, at fløskuhálsar taka seg upp.

*Bústaðarmarknaðurin trýstur av tilflytingini, sum hevur verið síðstu árini*

Eisini síggjast tekin um, at bústaðarmarknaðurin í miðøkinum og í stórum bygdum er trýstur av tí tilflyting, sum hevur verið síðstu 3-4 árini. Hetta sæst millum annað aftur í ógvusligum hækkingum í sethúsaprísum sambært uppgerðum hjá Betri Banka, sí mynd 3. Ógvusligu príshækkingarnar tykjast fyri tað nógva at vera avmarkaðar til miðøkið í landinum, meðan príshækkingarnar ikki tykjast vera eins stórar aðrastaðni í landinum.

**Mynd 2**

**Nýbygging av bústøðum um alt landið, nýíbindingar í elkervið hjá SEV, 1998 til 2016**




Viðm.: Myndin vísir nýíbindingar í elkervið hjá SEV um alt landið. Myndin fevnir um sethús, raðhús og íbúðir.
Kelda: Hagstovan.

Ein orsøk til trýstið sethúsamarknaðin er, at lutfalsliga fáar bústaðareindir eru bygdar síðstu 3-4 árini, hóast stóru nettotilflytingina, sum hevur verið hesi árini. Skrásettar nýíbindingar í elkervið hjá SEV benda á, at síðan 2013 eru bygdar undir 100 bústaðareindir um alt landið árliga, sí mynd 2 (hetta fevnir um sethús, raðhús og íbúðir).

Nettotilflytingin er í løtuni omanfyri 400 fólk árliga. Siga vit, at um tvey fólk í miðal eru í hvørjum húski, skulu helst byggjast í minsta lagi um 200 bústaðareindir árliga fyri at nøkta tørvin á bústøðum til tey, sum flyta til landið netto.

Harafturat er neyðugt at byggja bústaðareindir, so hvørt sum verandi hópur av bústøðum eldist og gerst ótíðarhóskandi. Ein orsøk til, at lutfalsliga fáar bústaðareindir eru bygdar síðstu árini er helst, at somikið nógv av øðrum byggivirksemi hevur verið í landinum, at byggifyritøkur hava ikki havt møguleika at fara undir aðrar verkætlanir, harundir bústaðarbygging.

**Mynd 3**

**Sethúsaprísir og lønargjaldingar fyri hvønn løntakara, Indeks 1998 = 100, 1998 til 2017**




Viðm.: Sethúsaprísir eru úr uppgerðini hjá Betri Banka. Sethúsaprísir fyri 2017 eru fyri fyrsta ársfjórðing 2017. Onnur tøl eru ársmiðal. Tølini fyri lønargjaldingar og atknýtt gjøld eru úr tjóðarroknskaparuppgerðum. Tjóðarroknskapurin eftir 2015 er framroknaður.
Kelda: Hagstovan og Betri Banki.

Mynd 3 omanfyri vísir gongdina í sethúsaprísum í landinum og gongdina í lønargjaldingum fyri hvønn løntakara. Ymiskar orsøkir kunnu vera til, at sethúsaprísir hækka. Høvuðsorsøkin er helst, at inntøkurnar í samfelagnum støðugt hækka og at fólk soleiðis fáa meira av tiltøkupeningi og kunnu taka størri lán. Ein onnur orsøk kann vera fólkatilflytingin, sum hevur verið síðstu árini og at ikki hevur verið bygt samsvarandi av nýggjum bústøðum hesi árini. Hetta sást millum annað í mynd 2. Ein triðja orsøk kann vera, at tað er vorðið lagaligari at fáa fígging úr peningastovnunum.

*Til ber ikki at staðfesta ovhiting av búskapinum, hóast tekin eru um fløskuhálsar*

Fíggjarmálaráðið metir ikki, at til ber at staðfesta við vissu, at føroyski búskapurin sum heild er ovhitaður ella at somikið nógv ferð er á búskapinum, at gongdin ikki er haldfør. Til tílíkar staðfestingar krevjast hagtøl og vitan um búskapin, sum ikki eru tøk hjá okkum, til dømis uppgerðir av tjóðarroknskapinum í føstum prísum.

Trupulleikarnir av fløskuhálsum, sum síggjast í løtuni, tykjast vera avmarkaðir til ávísar vinnugreinar og marknaðir og møguliga til ávís øki í landinum heldur enn at ávirka búskapin sum

heild. Sambært Hagstovuni veksur innflutningurin til beinleiðis húsarhaldsnýtsla í løtuni um 6% árliga, sum ikki er serstakliga stórur vøkstur í innflutninginum, sí eisini myndirnar 11 og 18. Í 2006 vaks innflutningurin til beinleiðis nýtslu til dømis um 17%.

Stórur útlánsvøkstur sæst heldur ikki í landinum, sí mynd 4. Síðsta árið eru bruttoútlán úr føroyskum peningastovnum til húsarhald í Føroyum til dømis vaksin um 4% og undir 1% til føroyskar vinnukundar. Hetta talar fyri, at búskapurin sum heild er ikki ovhitaður, og talar ikki fyri, at talan er um lánifíggjaðan vøkstur.

**Mynd 4**

**Inn og útlán til húsarhald í Føroyum, føroyskir peningastovnar, mia. kr., sept.-2013 til juli-2017**




Kelda: Hagstovan.

Heldur verandi gongd fram, er kortini vandi fyri, at stórar kostnaðar- og lønarhækkingar kunnu raka ávísar vinnugreinar og ávísar marknaðir, sum síðan kunnu spjaða seg til størri partar av búskapinum.

Skuldin hjá húsarhaldum og vinnufyritøkum er ikki vaksin nógv síðstu árini. Innlán hjá húsarhaldum og vinnufyritøkum eru eisini vaksin meira enn útlánini síðstu tvey árini. Gongdin í inn- og útlánum úr føroyskum peningastovnum til húsarhald í Føroyum sæst í mynd 4. Realkredittlán, sum føroysk húsarhald taka úr donskum realkredittfeløgum, er eisini minkað spakuliga síðstu 2-3 árini, sí eisini mynd 4.

Skuldin hjá føroyskum húsarhaldum og vinnufyritøkum er ikki høg sammett við privata skuld í øðrum londum í Vesturheiminum. Skuldin hjá føroyskum húsarhaldum verður mett til umleið 55-60% av BTÚ. Til dømis er skuldin hjá húsarhaldum í Danmark og Noregi er til dømis væl omanfyri 100% av BTÚ, meðan skuldin hjá húsarhaldum í Íslandi er 75-80% av BTÚ. Í ES er húsarhaldsskuldin í miðal á at kalla sama stigi sum í Føroyum, um 60% av BTÚ.

Samanumtikið bendir nógv á, at framgongdin í búskapinum síðstu árini hevur verið haldfør, og at hon hevur verið grundað á vaksandi framleiðslu og hækkandi inntøkur heldur enn at vera lánsfíggjað framgongd.

*Góða gongdin í alivinnuni heldur fram*

Mynd 5 vísir góðu gongdina í alivinnuni síðstu árini. Á myndini sæst tøkan av alifiski í kruvdari vekt og útflutningurin av aldum laksi í virði. Myndin vísir, at útflutningsvirðið er vaksið úr um 1,2 mia. kr. í 2009 til mettar omanfyri 4 mia. kr. í 2017. Gongdin kemur bæði av øktari framleiðslu og tøku og av serstakliga góðari prísgongd. Gongdin í alivinnuni síðstu umleið fimm árini er ein av orsøkunum til, at føroyska bruttotjóðarúrtøkan er vaksin somikið nógv sama tíðarskeið.

**Mynd 5**

**Tøka av aldum laksi og sílum, skift á ár, 1996 til 2017**




* Tøkan er í kruvdari vekt í tonsum. Tøkan í 2017 er mett grundað á fiskagoymsluna primo mars 2017 og støddarbýtið á fiskagoymslu.
Kelda: Hagstovan og Sp/F Avrik v. Rúna Dam.

Prísirnir á aldum laksi hava verið óvanliga høgir í nøkur ár. Prísirnir á aldum laksi hækkaðu serliga í 2013 og hækkaðu aftur eitt vet í 2014 og 2015. Higartil í ár hava prísirnir á aldum laksi verið á at kalla sama stigi í ár sum í 2016. Góða prísgongdin síðstu árini hevur havt við sær, at miðalprísurin á útfluttum aldum laksi úr Føroyum er tvífaldaður úr um 31 kr./kg. í 2012 til um 61 kr. kg. fyrra hálvár 2017.

Útlit eru eisini fyri høgum prísi á aldum laksi næstu tíðina. Hetta kemur av støðugt vaksandi eftirspurningi og av at útboðið av aldum laksi ikki væntast at vaksa í sama mun, millum annað orsakað av, at trupulleikar hava verið í fleiri alibrúkum í Kili. Í Noregi eru eisini ávísir trupulleikar, sum gera tað torført at økja um framleiðsluna og tøkuna.

Útflutningsvinnurnar og útlendis eftirspurningurin hava givið stórt ískoyti til búskaparvøksturin síðstu árini og fara eisini at gera tað í 2017 og sannlíkt eisini í 2018, tó at ískoytið kann minka nakað. Búskaparráðið roknar við, at næstu árini fer innlendis eftirspurningurin (húsarhaldsnýtsla, íløguvirksemi, almenn nýtsla og tílíkt) í størri mun at geva eitt ískoyti til vøksturin í bruttotjóðarúrtøkuni.

Føroysku alifyritøkurnar hava síðstu árini gjørt stórar íløgur í smoltstøðirnar á landi og ætla eisini framhaldandi at gera tílíkar íløgur næstu árini. Íløgurnar fara væntandi at hava við sær, at miðalstøddin á útsettum smoltum fer at vaksa úr 200-300g til góð 500g innanfyri 3-4 ár. Hetta fer síðani væntandi at hava við sær, at til ber at stytta framleiðslutíðina í sjónum úr góðum 16 til góðar 12 mánaðir.

Roknast kann tí við, at samlaða framleiðsluorkan í landinum av aldum laksi kann hækka um 20-25% næstu 4-5 árini, av tí at meira kann setast út av fiski, tá ið framleiðslutíðin á sjónum verður stytt. Hetta fer sannlíkt at hava við sær, at samlaða framleiðslan (tøkan) kann hækka úr verandi um 80 tús. tonsum í kruvdari vekt til út við 100 tús. tons í kruvdari vekt næstu 3-5 árini. Hetta fer væntandi at geva eitt ískoyti til vøksturin í búskapinum næstu 4-5 árini.

*Tekin síggjast um frægari útlit fyri fiskiskapin eftir botnfiski*

Avreiðingar av botnfiski fiskaður undir Føroyum eru framvegis søguliga smáar, sí mynd 6. Fyri fyrstu ferð í fleiri ár tykjast útlitini fyri toska- og hýsustovnin á landgrunninum nú at vera batnandi. Enn ber kortini ikki til at siga við vissu, at fiskiskapurin fer at batna næstu 1-2 árini.

Sambært Havstovuni benda yvirlitstrolingar á landgrunninum á, at toska- og hýsustovnurin eru við at koma fyri seg. Havstovan sigur eisini frá nógvum gróðri av plantuæti á landgrunninum í summar og at meira tykist vera til av nebbasild. Havstovan hevur áður víst á eitt týðuligt samband millum gróður av plantuæti á landgrunninum og teir hægru liðirnar í føðiketunum, íroknað nebbasild, sjófugl og botnfisk.

Á mynd 6 sæst, at avreiðingarnar av botnfiski um avreiðingarskipanina síðstu 3-4 árini hava verið lægri enn kreppuárini í 1990'unum. Við í mynd 6 verða eisini taldar avreiðingar av fiski fiskaður á Flemish Cap og undir Íslandi. Umstøðurnar eru framvegis torførar innan fiskiveiðuna á heimligu leiðunum og atknýttu fiskavirkisvinnuna á landi.

**Mynd 6**

**Føroyska feskfiskaveiðan eftir botnfiski í nøgd*, býtt á ársfjórðingar, tús. tons, 1993Q1 til 2017Q2**




* Tølini vísa veiðina, sum verður skrásett um avreiðingarskipanina og í avreiddari vekt.
Í avreiðingunum er allur fiskiskapur hjá føroyskum skipum og bátum á føroyskum sjóøki, føroyska feskfiskaveiðan í íslendskum sjóøki og fiskiskapurin á Flemish Cap.
Uppsjóvarfiskur er ikki við í uppgerðini.
Kelda: Hagstovan.

Roknast kann við, at fiskiskapurin eftir botnfiski á fjarleiðum, serstakliga í Barentshavinum og á Flemish Cap, fer at geva minni ískoyti til búskaparvøksturin næstu 1-2 árini sammett við árini frammanundan. Føroyska toskakvotan á Flemish Cap minkar 20% í 2018 sammett við í ár, og roknast kann eisini við, at føroysku toskakvoturnar í Barentshavinum minka næsta ár.

*Gongdin á arbeiðsmarknaðinum*

Føroyski arbeiðsmarknaðurin tykist framvegis at vera væl fyri. Størsta avbjóðingin fyri arbeiðsmarknaðin í løtuni er óivað trot á arbeiðsmegi og vandin fyri stórum lønar- og kostnaðarhækkingum av tí sama.

Skrásetta arbeiðsloysið í landinum var 2,2% í august, sum er sera lágt. Talið av løntakarum hækkar eisini støðugt og er nú ájavnt við metið, sum var í 2008. Arbeiðsloysið lækkaði støðugt úr um 7,5% tíðliga í 2011 til 2,1% í mai 2017. Frá mai til august í ár er arbeiðsloysið síðan hækkað til 2,2%. Á mynd 7 niðanfyri sæst gongdin í arbeiðsloysinum og løntakaratalinum.

Mynd 7

Árstíðarjavnað arbeiðsloysi í % av arbeiðsfjøld, jan-2005 til august-2017




Kelda: Hagstovan.

Síðsta árið ella so er arbeiðsloysið vorðið meiri ójavnt býtt kring landið. Arbeiðsloysið í Suðuroynni er ikki minkað eins nógv síðstu 1-2 árini sum aðrastaðni í landinum. Í august var arbeiðsloysið um 2% um tað mesta av landinum, meðan arbeiðsloysið var um 5% í Suðuroynni, sí mynd 8.

Mynd 8

Arbeiðsloysi í % av arbeiðsfjøld býtt á øki í landinum, apríl 2017 og august 2017




Kelda: Hagstovan.

Hetta kemur sjálvsagt fyri ein stóran part av eldsbrunanum á Tvøroyri, sum hevði við sær, at eitt stórt arbeiðspláss læt aftur. Roknast kann við, at arbeiðsloysið í Suðuroynni fer at minka næstu tíðina, so hvørt sum virksemið verður av at byggja virkið uppaftur, og tá ið virkið aftur fer at taka ímóti fiski. Men arbeiðsloysið í Suðuroynni var eisini væl omanfyri arbeiðsloysið aðrastaðni í landinum áðrenn eldsbrunan á Tvøroyri.

**Talva 1. Løntakarar í juni eftir vinnubólkum, 2014-2017, býtt á ár**

| *Vinnugrein* | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 | Munur 2014-17 | Munur í % |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Fiski-, ali- o.o. ráevnisvinna | 3.810 | 4.059 | 4.029 | 4.193 | 383 | 10,1 |
| Byggivinna o.o. tilvirking | 3.265 | 3.427 | 3.669 | 3.895 | 630 | 19,3 |
| Privatar tænastuvinnur | 8.113 | 8.371 | 8.573 | 8.725 | 612 | 7,5 |
| Almennar tænastur o.a. | 8.975 | 9.095 | 9.286 | 9.432 | 457 | 5,1 |
| *Almennar tænastur o.a. í %* | *37,1* | *36,5* | *36,3* | *35,9* | - | - |
| **Løntakarar tilsamans** | **24.163** | **24.952** | **25.557** | **26.245** | **2.082** | **8,6** |

*Kelda: Hagstova Føroya.*

Talið av løntakarum hækkar út við 3% árliga í løtuni og er nú komið á sama støði sum tíðliga í 2008 og undan fíggjarkreppuna, sí mynd 7. Talva 1 vísir løntakarar í juni síðani 2014 eftir høvuðsvinnugreinum. Talið á løntakarum er serstakliga vaksið í byggivinnuni síðsta árið, og talið á løntakarum er eisini vaksið nógv í fiski- og alivinnuni. Løntakararnir eru eisini fleiri í privatum og almennum tænastuvinnum.

**Mynd 9**

**Løntakarar tilsamans, býttir á aldursbólkar og ár, 2005 og 2016**




Kelda: Hagstovan.

Mynd 9 vísir løntakarar í landinum í 2005 og í 2016 býttir á aldursbólkar. Á myndini sæst, at løntakararnir eru vorðnir fleiri serstakliga orsakað av, at fleiri løntakarar eru í aldursbólkinum omanfyri 55 ár. Hesin aldursbólkurin av løntakarum er vaksin mest síðstu árini. Mynd 9 er dømi um, at demografiskar broytingar eru í samfelagnum og í fjøldini av løntakarum. Sambært flestu framrokningum av fólkatali og fólkasamanseting kann roknast við, at gongdin við, at løntakararnir gerast eldri í miðal, fer at halda fram næstu árini.

**Mynd 10**

**Lønargjaldingar, býtt á ársfjórðingar, 1. ársfjórðingur 1985 til 2. ársfjórðing 2017**




Viðm.: Mynd A vísir samlaðar lønargjaldingar í øllum vinnugreinum 1. ársfjórðing 1985 til 2. ársfjórðing 2017. Mynd B vísir lønargjaldingar í trimum útvaldum vinnugreinum 1. ársfjórðing 2000 til 2. ársfjórðing 2017. Kelda: Hagstovan.

Lønargjaldingar í Føroyum vaksa í løtuni 6% árliga. Lønargjaldingar tilsamans og í ymiskum høvuðsvinnugreinum síggjast í mynd 10 og í talvu 2. Vøksturin í lønargjaldingum tók dik á seg miðskeiðis í 2013 og hevur staðið við síðani. Vøksturin hevur serliga verið innan fiski- og alivinnu og byggivinnu, sum eru vístar høgrumegin í mynd 10. Innan privatar og almennar tænastuvinnur hevur eisini verið javnur vøkstur síðani 2013.

**Talva 2. Lønargjaldingar í høvuðsvinnugreinum, januar-juli, 2014-2017, mió. kr.**

| *Vinnugrein* | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 | Munur 2014-17 | Munur í % |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Fiski-, ali- o.o. ráevnisvinna | 774 | 893 | 993 | 1.042 | 268 | 34,6 |
| Byggivinna o.o. tilvirking | 534 | 583 | 633 | 711 | 177 | 33,1 |
| Privatar tænastuvinnur | 1.391 | 1.445 | 1.519 | 1.614 | 223 | 16,0 |
| Almennar tænastur o.a. | 1.568 | 1.621 | 1.693 | 1.760 | 192 | 12,3 |
| *Almennar tænastur o.a.%* | *36,8* | *35,7* | *35,0* | *34,3* | - | - |
| **Lønargjaldingar tilsamans** | **4.267** | **4.542** | **4.837** | **5.126** | **859** | **20,0** |

*Kelda: Hagstova Føroya.*

## *Húsarhaldsnýtsla og eftirspurningur*

Hagtøl benda á, at húsarhaldsnýtslan í Føroyum er vaks lítið fyrstu árini eftir fíggjarkreppuna, men at nýtslan er vaksin skjótari síðan 2013. Nýtslan tykist vera vaksin støðugt og javnt síðan 2013. Inntøkurnar hjá landinum frá meirvirðisgjaldinum benda eisini á, at húsarhaldsnýtslan er vaksin bæði í 2016 og aftur í ár. Innflutningurin av nýtsluvørum bendir eisini á, at húsarhaldsnýtslan er vaksin javnt síðstu umleið tvey árini.

Mynd 11 vísir innflutning av ymiskum nýtsluvørum býtt á ódrúgvar nýtsluvørur og hálvdrúgvar og drúgvar nýtsluvørur íroknað innflutning av akførum. Ódrúgvar nýtsluvørur fevna um mat-, drykkjuvørur og klædnavørur. Drúgvar og hálvdrúgvar nýtsluvørur fevna um akfør, elektronikk, hvítvørur og líknandi. Myndin vísir, at javnur vøkstur hevur verið í innflutninginum av vørum

síðan 2013. Hetta er tekin um, at nýtsla og eftirspurningur eru vaksin og at tey framvegis eru vaksandi.

**Mynd 11**

**Innflutningur av ódrúgvum, drúgvum og hálvdrúgvum nýtsluvørum og útgoldnar lønir, jan-1998 til aug-2017**




Viðm.: Myndin vísir 12-mánaðar samanløgd tøl fyri tær tríggjar strikurnar.
Kelda: Hagstovan.

Brúkarapristalið er hækkað nakað síðan fyrsta ársfjórðing 2016, og prístalið er hækkað um 2% síðsta árið ella so, sí mynd 12. Frammanundan hetta hevur samlaða brúkarapristalið verið rættiliga støðugt síðani miðskeiðis í 2008, tá ið fíggjar- og búskaparkreppan byrjaði. Høvuðsorsøkin til hækkandi prístalið síðsta árið er óivað, at oljuprísir eru hækkaðir nakað hetta tíðarskeiðið.

Rentustøðið í peningastovnunum er framvegis sera lágt, millum annað orsakað av harðari kapping á marknaðinum og sera lágum altjóða rentustøði. Lækkandi rentustøðið síðani fíggjar- og búskaparkreppuna hevur óivað verið ein av orsøkunum til, at prístalið ikki er hækkað stórvegis síðstu 7-8 árini. Aðrar orsøkir eru helst, at privati eftirspurningurin var heldur lágur og vaks lítið árini eftir kreppuna í 2009. Harafturat kemur sjálvsagt ógvusliga fallið í oljuprísum í 2014 og 2015.

**Mynd 12**

**Brúkarapristalið, 1. ársfjórðing 2001 til 2. ársfjórðing 2017, býtt á ársfjórðingar, indeks 2001 = 100**




Kelda: Hagstovan.

Samlaða konjunkturvísitalið er hækkað síðstu árini og eftir kreppuna í 2008 og 2009, sí mynd 13. Vísitalið fyri húsarhald er somuleiðis hækkað síðstu tíðina. Vísitalið vísir í stuttum, at vinnuvirki og

húsarhald framvegis eru bjartskygd um framtíðina. Tó lækkaði samlaða vísitalið nakað frá januar til juni, sí mynd 13. Samanumtikið rokna húsarhald við framgongd í búskapinum og støðugum ella lækkandi arbeiðsloysi. Vinnuvirki rokna sum heild við støðugum ella hækkandi eftirspurningi, og serliga fyritøkur í byggivinnuni lata væl at útlitunum fyri næsta árið. Samlaða konjunkturvísitalið lækkaði úr 31 til 26 síðsta hálvárið.

**Mynd 13**

**Samanvigað konjunkturvísital og vísital fyri húsarhald, jan-2006 til juni-2017**




Kelda: Hagstovan.

*Gongdin í fólkatalinum*

Hagtølini, sum verða nýtt niðanfyri í sambandi við fólkatal og flytingar stava frá landsfólkayvirlitinum og hagstovuni. Fólkatalið fevnir sostatt um øll, sum eru skrásett at búgva í landinum, harundir sjálvsagt eisini útlendingar, sum flyta til landið og fáa sær fastan bústað her.

Vøksturin í fólkatalinum síðan 2014 er eitt greitt tekin um framgongdina, sum hevur verið í búskapinum. Vanliga samsvara broytingar í fólkaflytingini úr Føroyum væl við umstøðurnar á arbeiðsmarknaðinum og í búskapinum sum heild. Tvær orsøkir til góðu gongdina í fólkatalinum eru óivað, at fleiri nýggj og vælønt størv hava tikið seg upp í landinum, og at nú ber til at taka fleiri útbúgvingar, sum lesandi ikki hava kunnað tikið áður.

**Mynd 14**

**Fólkatal í Føroyum, 1. januar, 1985-2017**




Kelda: Hagstovan.

Fráflytingin er minkað líðandi síðan tíðliga í 2013. Sambært Hagstovuni hevur fráflytingin roknað sum partur av fólkatalinum ikki verið lægri enn nú, síðani regluligar skrásetingar byrjaðu í 1970. Fólkatalið er hækkað síðstu 3-4 árini fyrst og fremst tí fráflytingin av landinum er minkað.

Tilflytingin er eisini hækkað síðstu árini, men hon er ikki hækkað eins nógv, og fráflytingin er minkað. Sambært Hagstovuni er tilflytingin nú tann mesta, sum hevur verið síðan árini síðst í 1990'unum og um aldarskiftið, tá ið samfelagið fótaði sær aftur eftir kreppuna tíðliga í 1990'unum.

**Mynd 15**

**Broytingar í fólkatalinum, 1970 til 2017**




* Tølini fyri árið 2017 eru metingar bygdar á fyrra hálvár 2017.
Kelda: Hagstovan.

Fólkatalið samanlagt er vaksið síðani 2013 og er nú nakað omanfyri 50 tús. fólk, sum er tað hægsta, sum hevur verið skrásett, sí mynd 14. Árini frammanundan lækkaði fólkatalið annars frá 2008 til 2013, og fólkatalið var at kalla óbroytt tíggjuáraskeiðið frá 2003 til 2013. Mynd 15 vísir árligar broytingar í fólkatalinum síðani 1970 við mettum tølum fyri 2017, og mynd 16 vísir gongdina í til- og fráflyting úr Føroyum býtt á mánaðir.

**Mynd 16**

**Nettoflyting til Føroyar, 12 mánaðar samanlagt, jan-2007 til juli-2017**




Kelda: Hagstovan.

Ein broyting, sum er farin fram síðsta árið og sum sæst á talvu 3, er, at fólkatalið í landinum nú ikki veksur mest í Tórshavnarøkinum. Síðsta árið er fólkatalið vaksið mest í Vágum og í Eysturoynni. Síðan fólkavøksturin tók dik á seg í 2013, er fólkatalið annars vaksið mest í Tórshavn og í miðøkinum. Tó at vøksturin í fólkatalinum tykist vera minkaður í Tórshavn, er mesti fólkavøksturin framvegis í miðøkinum í landinum. Hetta sæst eisini á mynd 17.

**Mynd 17**

**Broyting í fólkatali í % frá 1. jan. 2013 til 1. juli 2017, býtt á øki í landinum**




Kelda: Hagstovan.

Síðstu árini hevur verið sera lítil fólkavøkstur og tilflyting í Suðuroynni og á Sandoynni, meðan fólkavøksturin hevur verið aðrastaðni í landinum, sí mynd 17. Hesin munurin í til- og fráflytingini millum øki er tekin um, at framgongdin, sum hevur verið í búskapinum, ikki í sama mun er komin øllum økjum í landinum til góðar. Gongdin er eisini tekin um, at umstøðurnar á arbeiðsmarknaðinum ikki eru eins góðar í øllum økjum í landinum, og at í summum økjum í landinum eru fá størv tøk, sum samsvara við førleikarnar hjá lønmóttakarunum.

**Talva 3. Fólkatalið býtt á øki í landinum, 1. august 2016 til 1. august 2017**

| *Øki í landinum* | Fólkatal 1. aug. 2016 | Burðaravlop | Nettoflyting | Fólkatal 1. aug. 2017 | Broytt í tali | Broytt í % |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Norðuroyggjar | 5.961 | 26 | 66 | 6.053 | 92 | 1,5 |
| Eysturoy | 11.008 | 73 | 133 | 11.214 | 206 | 1,9 |
| Tórshavnar økið* | 19.117 | 124 | 109 | 19.350 | 233 | 1,2 |
| Streymoyggin annars | 4.629 | 27 | 46 | 4.702 | 73 | 1,6 |
| Vágoy | 3.152 | 29 | 37 | 3.218 | 66 | 2,1 |
| Sandoy | 1.264 | 5 | 13 | 1.282 | 18 | 1,4 |
| Suðuroy | 4.588 | -7 | 51 | 4.632 | 44 | 1,0 |
| **Alt landið** | **49.719** | **277** | **455** | **50.451** | **732** | **1,5** |

*Tórshavn, Hoyvík, Hvítanes og Argir.
*Kelda: Hagstova Føroya.*

Gongdin í fólkatalinum síðstu árini hevur havt við sær, at haldførið í búskapinum er batnað. Heldur verandi gongd fram við nettotilflyting og hækkandi fólkatali, fer hetta at gera avbjóðingina at betra um langtíðarhaldførið í búskapinum lættari at loysa. Enn ber ikki til at staðfesta, um gongdin við nettotilflyting og hækkandi fólkatali er eitt varandi fyribrigdi ella hvussu leingi hetta fer

at standa við. Í øllum førum er umráðandi, at átøk verða sett í verk fyri at tryggja, at tann fráflyting ikki tekur seg upp aftur, sum sást árini 2004 til 2014.

*Viðurskifti við útlond, handils- og gjaldsjavni*

Á mynd 18 sæst gongdin í føroyska inn- og útflutninginum síðan 1988 við mettum tølum fyri 2017. Myndin vísir sum heild, at innflutningurin verður ávirkaður av búskaparligu konjunkturunum í samfelagnum og serliga av innlendis eftirspurninginum. Harnæst hava oljuprísir stóra ávirkan á innflutningin. Óvanliga nógvur innflutningur av skipum ella flogførum ella óvanliga nógvar íløgur kunnu eisini ávirka innflutningin einstøk ár.

**Mynd 18**

**Innflutningur og útflutningur, mió. kr., 1988 til 2017**




Viðm.: Handilsjavnin fevnir bara um vørur; tænastur eru sostatt ikki við.
* Talið fyri árið 2017 er meting bygd á fyrra hálvár 2017.
Kelda: Hagstovan.

Útflutningurin er vaksin meiri støðugt síðstu árini, sammett við vøksturin í innflutninginum. Útflutningurin er síðani 2009 vaksin úr um 4 mia. kr., og heldur verandi gongd fram, kann roknast við, at útflutningurin í ár fer at tátta í 9 mia. kr. Útflutningurin í 2016 var um 8 mia. kr.

Á mynd 18 sæst eisini, at útflutningurin, helst aftur í ár, verður metstórur. Vøksturin kemur serliga av gongdini í alivinnuni og uppsjóvarvinnuni, har ið prísir eru hækkaðir, og nøgdirnar eru vaksnar. Avlopið á handilsjavnanum í 2016 var um 1,4 mia. kr. Í 2017 kann roknast við heldur minni avlopi á handilsjavnanum á nakað omanfyri 1 mia. kr. Orsøkin til, at avlopið á handilsjavnanum helst minkar í ár sammett við í fjør, er, at innflutningurin í ár er vaksin meiri enn útflutningurin.

Mynd 19
Rakstrarviðskifti gjaldsjavnans í mió. kr., 1998-2017




* Tølini fyri 2013 til 2017 eru leysligar metingar og skulu lesast við fyrivarni.
Kelda: Hagstovan.

Síðstu árini hava avlop verið á føroyska gjaldsjavnanum tey flestu árini, sí mynd 19. Uppgerðir eru ikki tøkar fyri gjaldsjavnan síðani 2012, men við støði í handilsjavnanum ber til at meta leysliga um gjaldsjavnan frá 2013 til 2017, hóast metingarnar eru óvissar.

Nógv bendir á, at lutfalsliga stór avlop vóru á gjaldsjavnanum frá 2013 til 2016. Heldur verandi gongd fram, verður sannlíkt eisini stórt avlop í ár. At gjaldsjavnin er batnaður somikið nógv síðan 2013 kemur millum annað av, at føroyska býtislutfallið er betrað munandi síðani 2013. Hetta merkir, at prísir á útfluttum vørum (serstakliga á aldum laksi og uppsjóvarfiski) eru hækkaðir munandi meiri í miðal sammett við prísirnir á innfluttum vørum (til dømis prísirnir á brennievni).

### *Heimsbúskapurin*

Nakað av óvissu er framvegis um gongdina í heimsbúskapinum næstu 1-2 árini. Óvissan er millum annað íkomin eftir fólkaatkvøðuna í Stóra Bretlandi um limaskapin í ES. Síðsta hálva árið hevur kortini verið størri framgongd enn áður væntað í Evropa, og útlitini tykjast vera betri fyri flestu búskapirnar í Evropa. Størstu orsøkirnar til, at gongdin er batnað í flestu londunum í Evropa, eru at fleiri íløgur verða gjørdar, at gongdin á arbeiðsmarknaðunum er batnað og at arbeiðsloysið er lækkandi og at húsarhaldsnýtslan hækkar spakuliga.

**Talva 4. Árligur vøkstur í BTÚ í føstum prísum 2014-2018 býtt á øki**

| *% um árið í føstum prísum** | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 | 2018 |
|---|---|---|---|---|---|
| USA | 2,4 | 2,6 | 1,6 | 2,1 | 2,1 |
| Evruøkið | 1,2 | 2,0 | 1,8 | 1,9 | 1,7 |
| Stóra Bretland | 3,1 | 2,2 | 1,8 | 1,7 | 1,5 |
| Ídnaðarlond tilsamans | 2,0 | 2,1 | 1,7 | 2,0 | 1,9 |
| Russland | 0,7 | -2,8 | -0,2 | 1,4 | 1,4 |
| Menningarlond | 4,6 | 4,3 | 4,3 | 4,6 | 4,8 |
| Heimsbúskapurin | 3,5 | 3,4 | 3,2 | 3,5 | 3,6 |

* Uppgerðirnar eru metingar frá miðskeiðis í juli mánaði í ár og skulu lesast við fyrivarni.
*Kelda: IMF World Economic Outlook Update, 24. juli 2017.*

Síðsta hálva árið hevur vøksturin í USA verið heldur lægri enn áður mett, men sambært metingum hjá IMF og OECD fer vøksturin í USA at taka dik á seg seinni í ár og næsta ár. Í Stóra Bretlandi hevur vøksturin verið lægri enn áður væntað orsakað av at fáar íløgur verða gjørdar, og at húsarhaldsnýtslan stendur í stað ella veksur sera lítið.

Roknast kann eisini við lágum búskaparvøkstri í Stóra Bretlandi næstu árini, millum annað orsakað av tí óvissu, sum er íkomin eftir fólkaatkvøðuna og orsakað av, at fleiri vinnufyritøkur hava hug at útseta íløgur. Miðbankin í Stóra Bretlandi roknar eisini við, at búskapurin har verður ávirkaður næstu 1-2 av tilgongdini at fara úr ES, millum annað tí at vandi er fyri størri prísvøkstri og av at hugurin at gera íløgur fer at minka. Í talvu 4 omanfyri síggjast metingar frá IMF um væntaða vøksturin í heiminum næstu árini.

Enn ber ikki til at siga, hvussu úrslitið av fólkaatkvøðuni í Stóra Bretlandi fer at ávirka føroyska búskapin næstu árini. Hetta er millum annað treytað av, hvat samband Stóra Bretland fer at hava við ES og Føroyar í framtíðini og hvørjar handils- og fiskiveiðiavtalur, londini semjast um.

Síðstu 3-4 árini hevur Russland verið tann marknaðurin, sum Føroyar hava útflutt mest til. Síðstu tvey árini er um fjórðingurin av føroyska útflutninginum farin til Russlands. Aðrir týðandi marknaðir fyri fyritøkur, sum útflyta fisk og aldan laks, eru Stóra Bretland, Danmark, Týskland og Kina.

Rentustøðið í Vesturheiminum er framvegis sera lágt, og í løtuni eru útlit til óvanliga lágt rentustøði næstu 1-2 árini, tó at rentustøðið kann hækka nakað sammett við verandi støði. Miðbankin í USA hevur síðstu mánaðirnar givið ábendingar um, at ætlanir eru um at byrja at hækka leiðandi renturnar stigvíst næstu tíðina. Sannlíkt verður kortini ikki talan um stórar rentuhækkingar. Miðbankin í Evropa hevur enn ikki givið somu ábendingar um, at ætlanir eru um at byrja at hækka leiðandi renturnar í næstum.

## Almenn fíggjarmál

Her verður stutt hugt at gongdini í úrslitinum hjá landskassanum sum heild síðstu árini. Hugt verður eisini stutt eftir skuldarstøðuni hjá landinum. Uppgerðir yvir samlaða almenna búskapin, tað er land, kommunur og sosialir grunnar, eru ikki tøkar nýggjari enn fyri 2013 og verða tí ikki brúktar í hesi frágreiðingini.

*Gongdin í úrslitinum síðstu árini og skuldin hjá landinum*

Mynd 20 vísir gongdina í inntøkum og útreiðslum hjá landskassanum og RLÚ-úrslit síðani 1997 við mettum tølum fyri 2017 og tølum úr fíggjarlógaruppskotinum fyri 2018. Á myndini sæst, at landið hevði hall øll árini frá 2008 til 2015, men at avlop var aftur í 2016. Avlopið hjá landinum (RLÚ-1 avlopið) var um 158 mió. kr. í 2016.

**Mynd 20**

**Úrslit landskassans, mió. kr., 1997 til 2018**




Viðm.: Tølini fram til og við 2016 eru roknskapartøl. Tølini fyri 2017 eru mett tøl. Tølini fyri 2018 eru úr uppskotinum til fíggjarlóg. Játtanirnar til Talgildu Føroyar og P/F Eysturoyar- og Sandoyartunlar verða í hesi myndini roknaðar sum rakstrarjáttanir.
* Úrslitið fyri 1998 er ávirkað av eftirgeving av donskum ríkislánum til Føroyar á 900 mió. kr.
Kelda: Gjaldstovan.

Heldur verandi gongd fram, eru útlit til, at avlopið hjá landinum verður væl omanfyri 400 mió. kr. í ár. Hetta er væl størri enn avlopið í upprunaligu fíggjarlógini fyri 2017. Munurin kemur fyri tað nógva av, at inntøkurnar hjá landinum frá skattum og avgjøldum eru væl hægri enn mettar í fíggjarlógini, millum annað orsakað av góðu gongdini í búskapinum. Harafturat hava verið ávísar serstakar umstøður í ár, sum hava givið størri inntøkur enn mett í fíggjarlógini.

Síðstu 3-4 árini hava inntøkurnar hjá landinum verið væl hægri enn mett í upprunaligu fíggjarlógunum, sum er komið av góðu búskapargongdini. Í 2015 minkaði hallið eisini av, at serligar umstøður vóru bæði á inntøku- og útreiðslusíðuni hjá landinum.

Á mynd 20 sæst, at útreiðslurnar hava verið meira støðugt vaksandi síðani 1997, meðan inntøkurnar eru vaksnar minni og meiri óstøðugt. Inntøkurnar hjá landinum fylgja í størri mun sveiggjunum, sum eru í búskapinum.

**Talva 5. Inntøkur landskassans frá skattum og avgjøldum,[a] mió. kr., 2009 til 2018**

| *Mió. kr.* | R2010 | R2011 | R2012 | R2013 | R2014 | R2015 | R2016 | M2017[b] | FLU-2018[b] |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Skattainntøkur | 1.934 | 2.126 | 1.937 | 1.976 | 2.138 | 2.130 | 2.050 | 2.246 | 2.255 |
| Avgjøld og tollur | 1.684 | 1.715 | 1.818 | 1.867 | 2.075 | 2.086 | 2.475 | 2.689 | 2.731 |
| Ymsar inntøkur | 19 | 113 | 33 | 63 | 62 | 51 | 43 | 123 | 48 |
| Flytingar | -129 | -136 | -144 | -156 | -198 | -332 | -332 | -315 | -326 |
| **Tilsamans** | **3.508** | **3.818** | **3.644** | **3.749** | **4.076** | **3.935** | **4.236** | **4.743** | **4.707** |

Viðmerkingar:
(a) Inntøkur landskassans fevna um rentupostar, skattainntøkur, avgjøld og toll, ymsar inntøkur, flytingar og heildarveiting. Talvan vísir sostatt allar inntøkur landskassans uttan rentupostar og heildarveiting.
(b) Tølini fyri 2017 og 2018 eru úr ávikavist mett tøl fyri 2017 og tøl úr uppskotinum til fíggjarlóg fyri 2018.
*Kelda: Gjaldstovan..*

At landið hevði hall frá 2008 til 2015, hóast stór framgongd var í búskapinum bæði í 2014 og 2015, bendir á, at langtíðarjavnvág er ikki millum inntøkur og útreiðslur hjá landinum. Síðstu 3-4 árini eru inntøkurnar hjá landinum kortini vaksnar munandi skjótari sammett við útreiðslurnar, og hetta hevur síðani havt við sær, at javnvágin er vorðin betri millum inntøkur og útreiðslur.

Talva 5 omanfyri vísir inntøkur landskassans frá skattum og avgjøldum. Rentuinntøkur og inntøkur frá heildarveitingini eru ikki vístar í talvuni. Talvan vísir sostatt ikki allar inntøkur landskassans men bara inntøkur frá skatti, avgjøldum og tolli, umframt flytingar til aðrar geirar og ymsar inntøkur (sum serstakliga fevnir um útluting úr almennum feløgum og grunnum).

Talva 6 vísir lánsbrævaskuld og innistandandi hjá landsstýrinum (gjaldførið). Lánsbrævaskuldin hjá landinum er vaksin munandi síðani 2007, men landið hevur enn ikki nógva skuld sammett við fleiri onnur lond í Vesturheiminum. Bruttoskuldin hjá landinum er um 30% av BTÚ. Harafturat hava kommunur um 1 mia. kr. í bruttoskuld tilsamans (um 6% av BTÚ). Almenna bruttoskuldin í Evropa er til sammetingar um 90% av BTÚ í miðal, meðan hon er um 45% av BTÚ í Danmark.

**Talva 6. Skuld landskassans[a] og innistandandi í mió. kr., 2009 til 2017**

| *Mió. kr.* | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 | 2017[b] |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Lánsbrævaskuld | 2.808 | 3.708 | 4.346 | 4.254 | 4.820 | 4.417 | 4.678 | 4.634 | 4.626 |
| Uttanlandsskuld - Danmark | 500 | 500 | 500 | 500 | 500 | 500 | 500 | 500 | 500 |
| Innistandandi | 1.467 | 1.881 | 2.514 | 2.175 | 2.456 | 2.015 | 2.374 | 2.339 | 2.855 |

Viðmerkingar:
(a) Talvan vísir langfreistaðu skuld landskassans. Aftrat langfreistaðu skuldini hevur landskassin stuttfreistaða skuld á um hálva mia. kr.
(b) Tølini fyri 2017 eru uppgjørdu saldurnar í september
*Kelda: Gjaldstovan.*

### *Sambærilig meting av rakstrarútreiðslum landskassans*

Torført er at sammeta játtanarroknskapir yvir fleiri ár. Í talvu 7 er hetta gjørt. Í talvuni eru rakstrarútreiðslurnar rættaðar fyri ávísar játtanir, sum eru tiknar úr. Til dømis fluttar til løgur ella fluttar í annan geira ella fluttar til ella frá inntøkujáttanum. Hyggja vit eftir játtanarroknskapinum frá 2010 til 2018, hevur vøksturin í rakstrarútreiðslunum hjá landinum tey flestu árini verið 2-3% um árið.

**Talva 7. Rakstrarútreiðslur landskassans vístar sambæriligar[a] og eftir játtanarslagi, mió. kr., 2010 til 2018**

| *Mió. kr.* | R2010 | R2011 | R2012 | R2013 | R2014 | R2015 | R2016 | J2017[b] | FLU-2018[b] |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Stuðul | 98 | 136 | 133 | 142 | 143 | 159 | 163 | 179 | 193 |
| Lógarbundið | 1.291 | 1.241 | 1.267 | 1.289 | 1.304 | 1.350 | 1.352 | 1.372 | 1.388 |
| Rakstur | 2.512 | 2.526 | 2.549 | 2.593 | 2.659 | 2.705 | 2.844 | 2.923 | 2.980 |
| **Tilsamans** | **3.900** | **3.903** | **3.948** | **4.023** | **4.105** | **4.214** | **4.358** | **4.474** | **4.560** |
| *Vøkstur í %* | - | *0,1* | *1,1* | *1,9* | *2,0* | *2,7* | *3,4* | *2,6* | *1,9* |

Viðmerkingar:
(a) Rakstrarútreiðslurnar hjá landskassanum eru gjørdar sambæriligar yvir tíð við at rætta fyri hesi viðurskifti: eldraøkið, endurgjald fyri eftirlønir í 2010, FAS-skipanin, Barsilsskipanin, løgur í Eystur- og Sandoyartunlar, Talgildu Føroyar, løgustuðul til kommunur og sjálvsognarstovnar.
(b) Tølini fyri 2017 og 2018 eru úr ávikavist játtanartølum fyri 2017 og úr uppskotinum til fíggjarlóg fyri 2018.
*Kelda: Fíggjarmálaráðið.*

Søguliga sæð hevur greitt samband og samanhangur verið millum vøksturin í framleiðsluni (til dømis mátað við BTÚ) og almennu útreiðslurnar. Verður sammett yvir tíð, til dømis frá 1998 og frameftir, sæst, at almennu útreiðslurnar og vøksturin í BTÚ hava lyndi at fylgjast.

*Bygnaðarliga úrslitið*

Metingar hjá Fíggjarmálaráðnum av bygnaðarliga úrslitinum hjá tí almenna vísa, at í 2016 var bygnaðarligt avlop á um 0,5% av BTÚ, ella um 50-100 mió. kr. Metingarnar benda á, at tað almenna eisini hevur bygnaðarligt avlop í 2017, og at avlopið er vaksið til um 1% av BTÚ. Fíggjarmálaráðið metir, at við verandi uppskoti til fíggjarlóg og verandi búskapargongd annars verður bygnaðarliga avlopið hjá tí almenna 1-1,5% av BTÚ í 2018.

Avbjóðingin at betra haldførið í almenna búskapinum verður ikki minni av, at útreiðslurnar hjá landi og kommunum á millum annað heilsu- og almannaøkinum fara at vaksa munandi næstu árini. Hetta kemur av broyttari aldurssamanseting, betri tøkni í heilsuverkinum og harav viðgerðarmøguleikum og fer at hava við sær stórt trýst á útreiðslurnar hjá landi og kommunum, sum nú umsita eldraøkið.

*Landið hevur sera gott kredittvirði*

Landsstýrið tók í juni mánaði í ár lánsbrævalán, sum var 550 mió. kr. Gildistíðin á láninum er seks ár, og rentan á láninum er 0,59% p.a., sum er søgiliga lágt. Harafturat tók landsstýrið í juni mánaði eitt longri lán á 450 mió. kr. við 15-ára gildistíð og rentuni 1,75% p.a. Tey bæði lánini eru brúkt til at endurfíggja lán, sum eru fallin til gjaldingar í juni í ár. Einki lán hjá landsstýrinum fellur til gjaldingar í 2018. Umfíggingin til lánið við longri gildistíð var eisini liður í at tryggja landinum betri rating og fylgja tilmælum frá Moodys. Lántøkan við longri gildistíð hevur við sær, at vandin fyri ógvusligum hækkingum í rentuútreiðslunum hjá landinum minkar.

Landið hevur framvegis sera gott kredittvirði, og kredittmetingarfyrtøkan Moody's endurtók eisini skoðsmálið (ratingina) av lánførinum hjá landinum í februar í ár. Útlitini fyri skoðsmálið eru eisini støðug, og metingarfyritøkan hevur eisini tikið lántøkuna í sambandi við stóru tunnilsverkætlanirnar, Eysturoyar- og Sandoyartunlarnir, við í metingarnar.

Sostatt bendir alt á, at kredittvirðið hjá landinum framhaldandi verður sera gott næstu árini. Miðalgjaldførið hjá landinum higartil í ár er um 2,9 mia. kr., sum er væl omanfyri minstagjaldførið í 2017 á um 2,5 mia. kr.

## Uppskotið til fíggjarlóg fyri 2018

Talvan niðanfyri vísir inntøkur, útreiðslur og RLÚ-úrslitið í fíggjarlógaruppskotinum fyri 2018. Í talvuni niðanfyri eru nettorentuinntøkur (um 20 mió. kr.) tiknar við á inntøkusíðuni, og løgujáttanir eru íroknaðar útreiðslunum tilsamans.

| **Høvuðstøl í fíggjarlógaruppskotinum fyri 2018** | |
|---|---|
| *Mió. kr.* | **2018** |
| Inntøkur tilsamans | 5.369 |
| Útreiðslur tilsamans | 4.961 |
| RLÚ-úrslit | 408 |

### Framrokningar av inntøkum og útreiðslum

Stóru inntøkukeldurnar, vanligur landsskattur og meirvirðisgjald, eru í 2018 framroknaðar við metta vøkstrinum í ársins prísum, sum er um 3% í 2018. Eftir hetta er framroknað við mettum vøkstri í føstum prísum.

### Játtanir innan løgur í 2018

Innan løgujáttanir eru hesar millum stóru játtanirnar í 2018:

- Glasir (Skúladepilin við Marknagil)
- Útbygging av Landssjúkrahúsinum og Klaksvíkar sjúkrahúsi
- Nýggja havrannsóknarskipið
- Umvæling av almennum bygningum
- Nýggir bústovnar
- Játtan til felagið P/F Eysturoyar- og Sandoyartunlar
- Talgildu Føroyar
- Miðnám í Kambsdali
- Húsarhaldsskúla í Klaksvík
- Eftirskúla og ítróttarháskúli í Suðuroy
- Nýggj høli til Sjóvinnustýrið í Vágunum

Játtanirnar til Talgildu Føroyar og P/F Eystur- og Sandoyartunlar eru samanlagt 55 mió. kr. í 2018.

## Inntøkur landskassans í 2018

Inntøkurnar eru mettar til 5.369 mió. kr. netto í 2018 (íroknað mettar rentuinntøkur á um 20 mió. kr. netto í 2018). Nettoinntøkur frá skattum eru mettar til 2.255 mió. kr. Avgjøld og tollur eru mett til 2.731 mió. kr. netto. Heildarveitingin verður 642 mió. kr.

Talvan niðanfyri vísir inntøkurnar í fíggjarlógaruppskotinum fyri 2018. Serstakar umstøður hava verið í 2017, sum hava havt við sær munandi størri inntøkur frá skattum og avgjøldum sammett við metingarnar í fíggjarlógini fyri 2017.

Nevnast kann, at felagsskatturin, kapitalvinningsskatturin, meirvirðisgjaldið og inntøkurnar frá tilfeingisgjøldum á ali- og fiskivinnuna øll hava verið munandi hægri enn mett, eins og greitt verður frá undir játtanareftirlitinum. Harafturat var ein útluting av vinningsbýti á 100 mió. kr. úr Fíggingargrunninum, sum eisini hevur ávirkað inntøkurnar í 2017. Orsakað av hesum serstøku umstøðunum í 2017, verða inntøkurnar tilsamans mettar at minka góðar 20 mió. kr. í 2018 sammett við 2017. Inntøkuframskrivingarnar eru varligar. Eitt nú er lønarvøkstur ikki innroknaður í framskriving av landsskatti, tí lønarsáttmálar enn ikki eru gjørdir fyri almenna arbeiðsmarknaðin. Inntøkur frá fiskivinnuni í 2018 verða mettar at verða áleið tær somu sum í 2017.

**Meting av inntøkum landskassans í 2017 og 2018**

| *mió. kr.* | **R-2016** | **FL-2017** | **Meting 2017** | **FL-2018** | **Munur frá FL17 til FL18 (%)** |
|---|---|---|---|---|---|
| Rentur | -21 | 5 | 4 | 20 | 300,0% |
| Skattainntøkur | 2.050 | 2.082 | 2.246 | 2.255 | 8,3% |
| Avgjøld og tollur | 2.475 | 2.502 | 2.689 | 2.731 | 9,2% |
| Ymsar inntøkur | 43 | 40 | 123 | 48 | 20,3% |
| Flytingar | -332 | -326 | -315 | -326 | 0,0% |
| Heildarveiting o.t. | 642 | 642 | 642 | 642 | 0,0% |
| **Tilsamans** | **4.857** | **4.944** | **5.389** | **5.369** | **8,6%** |

## Útreiðslur landskassans í 2018

Rakstrar-, løgu- og útlánsútreiðslur (netto) verða mettar til 4.961 mió. kr. í 2018. Harav eru rakstrarútreiðslurnar 4.617,7 mió. kr., og løguútreiðslurnar eru 343,5 mió. kr., ikki íroknað játtanirnar til Talgildu Føroyar og P/F Eystur- og Sandoyartunlar. Játtanirnar til Talgildu Føroyar og P/F Eystur- og Sandoyartunlar eru tilsamans 55 mió. kr. í 2018. Hetta er heldur ikki íroknað aðrar stuðulsjáttanir til løgur, so sum Húsarhaldsskúla, Eftirskúla, Ítróttaháskúla og bókasøvn fyri íalt 6,5 mió.kr.

Talvan niðanfyri vísir útreiðslurnar hjá landskassanum útgreinaðar.

**Meting av útreiðslum landskassans í 2017 og 2018**

| *mió. kr.* | **R-2016** | **FL-2017** | **Meting 2017** | **FL-2018** | **Munur FL-2017 til FL-2018 (%)** |
|---|---|---|---|---|---|
| Rakstur* | 4.368 | 4.470 | 4.538 | 4.556 | 1,9% |
| Løgukendar útreiðslur | 33 | 56 | 44 | 61 | 10,2% |
| Løgur | 299 | 213 | 347 | 344 | 61,3% |
| **Tilsamans** | **4.699** | **4.739** | **4.929** | **4.961** | **4,7%** |

*Løgukendar útreiðslur eru: Talgildu Føroyar, P/F Eystur- og Sandoyartunlar og løgukendar stuðulstjáttanir til Húsarhaldsskúla, Eftirskúla oa. Sí talvu á næstu síðu.

## Løgur í 2018

Játtaðar verða 343,5 mió. kr. til løgur, umframt 35 mió. kr. Eystur- og Sandoyartunlar, 20 mió. kr. til Talgildu Føroyar og 6,5 mió. kr. í løgustuðli til eftirskúla í Suðuroy, húsarhaldsskúla í Klaksvík, bókasøvn og ítróttaháskúla í Vági. Íalt 405 mió. kr. til løgur og løgukendar útreiðslur (í kursiv).

Óbrúktar løgujáttanir eru eisini frá 2017, sum hava átekning, soleiðis at til ber at framflyta hesar til fíggjarárið 2018. Talvan niðanfyri vísir, hvussu løgukarmurin á 405 mió. kr. í uppskotinum til fíggjarlóg fyri 2018 er raðfestur.

| **Løguætlanin fyri 2018** ***(mió. kr.)*** | |
|---|---|
| | |
| **Løgur §1 - §17 tilsamans** | **405.000** |
| | |
| **§1 Løgtingið** | **0** |
| | |
| **§2 Løgmansfyrisitingin** | **3.000** |
| Umbygging í Tinganesi | 3.000 |
| | |
| **§3 Fíggjarmál** | **20.000** |
| *Talgildu Føroyar* | *20.000* |
| | |
| **§5 Fiskivinnumál** | **85.000** |
| Havrannsóknarskip | 85.000 |
| | |
| **§ 7 Mentamál** | **86.300** |
| Skúladepil við Marknagil | 63.500 |
| Tjóðleikhús | 3.000 |
| *Eftirskúli* | *2.000* |
| *Ítróttarháskúli í Vági* | *1.000* |
| *Húsarhaldsskúli* | *2.000* |
| Miðnámsskúlin á Kambsdali | 5.000 |
| Bakkaverja í Kirkjubø | 1.000 |
| Fróðskaparsetur Føroya | 5.000 |
| Hvalastøðin við Áir | 1.000 |
| *Bókasøvn* | *1.500* |
| Kirkjubømúrurin | 1.300 |
| | |
| **§ 11 Heilsu- og innlendismál** | **112.000** |
| Medicoteknisk tól | 9.000 |
| Klaksvíkar sjúkrahús, menningarætlan | 10.000 |
| Landssjúkrahúsið | 93.000 |
| | |
| **§ 12 Almannamál** | **35.000** |
| Bygging ella útvegan av bústøðum | 35.000 |

| **§ 13 Uttanríkis- og vinnumál** | **5.000** |
| --- | --- |
| Sjóvinnustýrið | 5.000 |

| **§ 17 Samferðslumál** | **58.700** |
| --- | --- |
| Umvæling av almennum bygningum | 21.000 |
| Almennir bygningar, søla | -30.000 |
| Ferðsluætlan Vágar | 2.000 |
| Nýggir landsvegir | 26.000 |
| Havnir | 3.200 |
| Strandfaraskip Landsins | 3.500 |
| *P/Eystur- og Sandoyartunlar* | *35.000* |

| **Løgur § 1 - § 17 tilsamans** | **405.000** |
| --- | --- |

## Játtanareftirlit í fíggjarárinum 2017

Í játtanarskipanini er ásett, at saman við fíggjarlógaruppskotinum skal greiðast frá játtanareftirlitinum í fíggjarárinum. Her verður greitt frá játtanarligu støðuni samanlagt og fyri hvørja grein sær. Eisini verður víst yvirlit yvir hvørjar játtanir (høvuðskontur), ið verða mettar at fara at víkja frá upprunaligu játtanini, tá ið fíggjarárið er farið. Her verða bæði tiknar við eykajáttanir og játtanir, har ið mett er, at frávik verður, tá ið fíggjarárið er av.

**Meting av úrsliti landskassans í 2017 sammett við fíggjarlógina fyri 2017**

| *1.000 kr.* | **FL-2017** | **Meting 2017** | **Frávik** | **Frávik (%)** |
|---|---|---|---|---|
| Inntøkur | 4.943.890 | 5.388.840 | 444.950 | 9,0% |
| Rakstrarútreiðslur* | 4.525.526 | 4.582.364 | 56.838 | 1,3% |
| Løguútreiðslur | 212.685 | 346.820 | 134.135 | 63,1% |
| **RLÚ-úrslit** | **205.679** | **459.656** | **253.977** | **123,5%** |

*Játtanirnar til Talgildu Føroyar og P/F Eystur- og Sandoyartunlar og løguskendur stuðul eru íroknaðar rakstur í hesi uppgerðini.

Í talvuni omanfyri er víst RLÚ-úrslit fyri greinarnar 1 til 20 (vanligir postar). Fyri 2017 verður roknað við, at úrslitið (RLÚ-1) gerst eitt avlop á um 460 mió. kr. Fleiri orsøkir eru til, at avlopið væntandi verður størri enn tær sløku 206 mió. kr. á fíggjarlógini fyri 2017.

Høvuðsorsøkin er, at inntøkurnar væntandi vera um 445 mió. kr. hægri enn mettu inntøkurnar í fíggjarlógini. Hinvegin verða rakstrarútreiðslurnar, íroknað stuðuls- og lógarbundar játtanir, væntandi slakar 57 mió. kr. hægri enn mett, og løguútreiðslurnar, íroknað framflyting frá 2016 og eykajáttanir í 2017, verða væntandi 134 mió. kr. hægri enn ásett í fíggjarlógini fyri 2017.

**Meting av inntøkum landskassans í 2017 sammett við fíggjarlógina eftir virksemisøki**

| *1.000 kr.* | **R-2016** | **FL-2017** | **Meting 2017** | **Frávik** | **Frávik (%)** |
|---|---|---|---|---|---|
| Rentur av skuld | -54.000 | -20.000 | -20.000 | 0 | 0,0% |
| Rentuinntøkur o.tíl. | 32.763 | 24.900 | 24.100 | -800 | -3,2% |
| Skattainntøkur | 2.049.884 | 2.081.940 | 2.246.440 | 164.500 | 7,9% |
| Avgjøld og tollur | 2.475.038 | 2.501.750 | 2.689.000 | 187.250 | 7,5% |
| Ymsar inntøkur | 43.182 | 39.500 | 122.500 | 83.000 | 210,1% |
| Flytingar | -332.094 | -326.000 | -315.000 | 11.000 | -3,4% |
| Heildarveiting o.t. | 641.800 | 641.800 | 641.800 | 0 | 0,0% |
| **Tilsamans** | **4.856.572** | **4.943.890** | **5.388.840** | **444.950** | **9,0%** |

Roknað verður sum nevnt við, at inntøkurnar vera tilsamans um 445 mió. kr. hægri enn mettar, tá ið fíggjarlógin fyri 2017 varð samtykt. Høvuðusorsøkirnar eru serstaka útlutingin úr Fíggingargrunninum á 100 mió. kr. og hægri inntøka frá felagsskatti (125 mió. kr. hægri enn mett),

avgjaldið á fiskatilfeingi (70 mió. kr. hægri enn mett), loyvisgjaldið á alivinnu (47 mió. kr. hægri enn mett) og meirvirðisgjaldið (50 mió. kr. hægri enn mett).

**Meting av útreiðslum landskassans í 2017 sammett við fíggjarlógina eftir játtanarslagi**

| *1.000 kr.* | **FL-2017** | **Meting 2017** | **Frávik** | **Frávik (%)** |
|---|---|---|---|---|
| Stuðulsjáttan | 211.334 | 251.172 | 39.838 | 18,9% |
| Rakstrarjáttan | 2.942.502 | 2.939.332 | -3.170 | -0,1% |
| Løgujáttan | 212.685 | 346.820 | 134.134 | 63,1% |
| Lógarbundin játtan | 1.371.690 | 1.391.860 | 20.170 | 1,5% |
| **Tilsamans** | **4.738.211** | **4.929.183** | **190.973** | **4,0%** |

Sammett við fíggjarlógina verður roknað við minni nýtslu á rakstrarjáttanum fyri tilsamans um 3 mió. kr. Innan løgujáttanir verður frávikið væntandi um 134 mió. kr. Løgujáttanirnar á fíggjarlógini fyri 2017 vóru tilsamans 212,7 mió. kr. Harafturat eru løgujáttanir fyri tilsamans 61,5 mió. kr. fluttar frá eldri árum og roknað verður við eykajáttanum fyri tilsamans 52,5 mió. kr. Metta nýtslan í 2017 av løgujáttanum verður væntandi tilsamans 347 mió. kr.

Frávikið á stuðulsjáttanum hevur í høvuðsheitinum samband við stuðul til P/F Fiskaaling og stuðul til skipasmíð, harav serliga til nýtt havrannsóknarskip. Frávikið fyri lógarbundnar játtanir stavar serliga frá høvuðskontunum fyri vanliga forsorg, arbeiðsfremjandi tiltøk og fólkapensjón.

| *1.000 kr.* | | **FL-2017** | **Meting 2017** | **Frávik** | **Frávik (%)** |
|---|---|---|---|---|---|
| § 1 | Løgtingið | 54.895 | 54.295 | -600 | -1% |
| § 2 | Løgmansfyrisitingin | 38.309 | 40.609 | 2.300 | 6% |
| § 3 | Fíggjarmál | 320.942 | 311.142 | -9.800 | -3% |
| § 5 | Fiskivinnumál | 174.808 | 183.078 | 8.270 | 5% |
| § 7 | Mentamál | 1.153.656 | 1.213.256 | 59.600 | 5% |
| § 11 | Heilsu- og innlendismál | 1.141.339 | 1.165.959 | 24.620 | 2% |
| § 12 | Almannamál | 1.466.286 | 1.486.306 | 20.020 | 1% |
| § 13 | Uttanríkis- og vinnumál | 103.542 | 142.330 | 38.788 | 38% |
| § 17 | Samferðslumál | 284.434 | 332.209 | 47.775 | 17% |
| | Útreiðslur tilsamans | 4.738.211 | 4.929.184 | 190.973 | 4% |
| § 20 | Inntøkur | 4.943.890 | 5.388.840 | 444.950 | 9% |
| | **Úrslit (RLÚ)** | **205.679** | **459.656** | **253.977** | **123%** |

Í talvuni omanfyri eru vístar bæði stuðulsjáttanir, rakstrarjáttanir, løgujáttanir og lógarbundnar játtanir. Frávikini eru nærri lýst í øðrum talvum. Av størru frávikum kunnu millum onnur nevnast, at á grein 7 Mentamál er ein eykajáttan á 50 mió. kr. umbiðin til Skúladepilin við Marknagil (Glasir). Á greinini Heilsu- og innlendismál stavar frávikið serliga frá løgujáttan á góðar 21 mió. kr. til útbygging av Landssjúkrahúsinum, ið er flutt frá eldri árum.

Á greinini Almannamál er løgujáttan til bústovnar o.a. á knappar 14 mió. kr. flutt frá eldri árum. Frávikið á greinini Uttanríkis- og vinnumál stavar serliga frá eykajáttanum á tilsamans 15 mió. kr. í sambandi við stuðul til P/F Fiskaaling og 22,9 mió. kr. í sambandi við stuðul til skipasmíð, harav meginparturin er til bygging av nýggjum havrannsóknarskipi. Frávikið á greinini Samferðslumál stavar serliga frá, at søla av almennum bygningum hevur givið 36 mió. kr. minni enn ætlað og at játtan á knappar 8 mió. kr. til nýggjar landsvegir er flutt frá eldri árum.

## Rakstrarjáttanareftirlit

Niðanfyri verður hugt nærri eftir, hvussu játtanarliga støðan er á rakstrarjáttanum, stuðulsjáttanum og lógarbundnum játtanum hjá aðalráðunum. Løgujáttanir eru ikki við í talvunum niðanfyri. Í staðin er serstakt løgujáttanareftirlit síðst í frágreiðingini eftir rakstrarjáttanareftirlitið.

## § 1 Løgtingið

**Játtanarliga støðan í september 2017**

| Høvuðs-konta | Stovnur/játtan | Játtanarslag | Frávik *(kr.)* | Viðmerking |
|---|---|---|---|---|
| 10.1.02. | Eftirløn og bíðiløn til løgtingsmenn | Lógarbundin | -200.000 | Mett frávik |
| 10.1.03. | Løgtingsarbeiði | Rakstur | -400.000 | Mett frávik + eykajáttan umbiðin í august |
| **Tilsamans** | | | **-600.000** | |

**Meting av útreiðslum á §1 í 2017 sammett við fíggjarlógina fyri 2017**

| *1.000 kr.* | FL-2017 | Meting 2017 | Frávik | Frávik (%) |
|---|---|---|---|---|
| Stuðulsjáttan | 0 | 0 | 0 | 0,0% |
| Rakstrarjáttan | 47.895 | 47.495 | -400 | -0,8% |
| Lógarbundin játtan | 7.000 | 6.800 | -200 | -2,9% |
| **Tilsamans** | **54.895** | **53.295** | **-600** | **-1,1%** |

# § 2 Løgmansfyrisitingin

| Játtanarliga støðan í september 2017 | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Høvuðs-konta** | **Stovnur/játtan** | **Játtanarslag** | **Frávik** *(kr.)* | **Viðmerking** |
| 11.1.02. | Løgmansskrivstovan | Rakstur | -121.000 | Mett frávik |
| 14.1.01. | Ymsar útreiðslur | Rakstur | 121.000 | Mett frávik |
| **Tilsamans** | | | **0** | |

**Meting av útreiðslum á §2 í 2017 sammett við fíggjarlógina fyri 2017**

| *1.000 kr.* | FL-2017 | Meting 2017 | Frávik | Frávik (%) |
|---|---|---|---|---|
| Stuðulsjáttan | 5.100 | 5.100 | 0 | 0,0% |
| Rakstrarjáttan | 31.409 | 31.409 | 0 | 0,0% |
| Lógarbundin játtan | 0 | 0 | 0 | 0,0% |
| **Tilsamans** | **36.509** | **36.509** | **0** | **0,0%** |

# § 3 Fíggjarmál

**Játtanarliga støðan í september 2017**

| Høvuðs-konta | Stovnur/játtan | Játtanarslag | Frávik *(kr.)* | Viðmerking |
|---|---|---|---|---|
| 11.1.61. | Talgildu Føroyar | Rakstur | -12.000.000 | Mett frávik |
| 15.1.07. | Føroya Gjaldstova | Rakstur | -200.000 | Eykajáttan umbiðin í august |
| 15.2.01. | Hagstova Føroya | Rakstur | 600.000 | Eykajáttan umbiðin í august |
| 18.1.10. | Postverk Føroya, eftirlønir | Lógarbundin | -300.000 | Mett frávik |
| 21.2.01. | Stuðul til flutning og dupult húsarhald | Lógarbundin | 2.500.000 | Eykajáttan umbiðin í august |
| 24.3.27. | Saltsilo, rakstrarstuðul | Stuðul | -400.000 | Eykajáttan umbiðin í august |
| **Tilsamans** | | | **-9.800.000** | |

**Meting av útreiðslum á §3 í 2017 samanborið við fíggjarlógina fyri 2017**

| *1.000 kr.* | FL-2017 | Meting 2017 | Frávik | Frávik (%) |
|---|---|---|---|---|
| Stuðulsjáttan | 2.800 | 2.400 | -400 | -14,3% |
| Rakstrarjáttan | 141.992 | 130.392 | -11.600 | -8,2% |
| Lógarbundin játtan | 176.150 | 178.350 | 2.200 | 1,3% |
| **Tilsamans** | **320.942** | **311.142** | **-9.800** | **-3,1%** |

# § 5 Fiskivinnumál

| **Játtanarliga støðan í september 2017** | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Høvuðs-konta** | **Stovnur/játtan** | **Játtanarslag** | **Frávik** *(kr.)* | **Viðmerking** |
| 34.1.05. | Hvalagransking og hvalateljing | Rakstur | 70.000 | Mett frávik |
| 34.2.22. | Flutningsstuðul | Lógarbundin | 700.000 | Eykajáttan umbiðin í august |
| **Tilsamans** | | | **770.000** | |

| **Meting av útreiðslum á §5 í 2017 sammett við fíggjarlógina fyri 2017** | | | | |
|---|---|---|---|---|
| *1.000 kr.* | **FL-2017** | **Meting 2017** | **Frávik** | **Frávik (%)** |
| Stuðulsjáttan | 18.200 | 18.200 | 0 | 0,0% |
| Rakstrarjáttan | 143.408 | 143.478 | 70 | 0,1% |
| Lógarbundin játtan | 2.200 | 2.900 | 700 | 31,8% |
| **Tilsamans** | **163.808** | **164.578** | **770** | **0,5%** |

# § 7 Mentamál

| Játtanarliga støðan í september 2017 | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Høvuðs-konta** | **Stovnur/játtan** | **Játtanarslag** | **Frávik** *(kr.)* | **Viðmerking** |
| 23.1.31 | Próvtøkur | Rakstur | 2.890.000 | Eykajáttan umbiðin í august |
| 23.2.01 | Fólkaskúlin | Rakstur | -500.000 | Eykajáttan samtykt í august |
| 23.2.02 | Sernám | Rakstur | -250.000 | Eykajáttan umbiðin í august |
| 23.2.10 | Eftirskúlar | Stuðul | -200.000 | Eykajáttan samtykt í august |
| 23.3.11 | Ferðavinnuútbúgving | Rakstur | -400.000 | Eykajáttan samtykt í august |
| 23.6.05 | Maritimir skúlar | Rakstur | -200.000 | Eykajáttan samtykt í august |
| 23.6.16 | Fróðskaparsetur Føroya | Rakstur | 900.000 | Eykajáttan samtykt í august |
| 23.6.24 | ES-granskingarskrá | Stuðul | 1.100.000 | Mett frávik |
| 24.1.13 | Ymiskir studningar | Stuðul | -100.000 | Eykajáttan samtykt í august |
| 24.6.06 | Ítróttasamband Føroya | Stuðul | 800.000 | Eykajáttan umbiðin í august |
| 38.3.07 | Kringvarpssendistøðir | Rakstur | 1.170.000 | Eykajáttan samtykt í august |
| **Tilsamans** | | | **5.210.000** | |

**Meting av útreiðslum á §7 í 2017 samanborið við fíggjarlógina fyri 2017**

| *1.000 kr.* | FL-2017 | Meting 2017 | Frávik | Frávik (%) |
|---|---|---|---|---|
| Stuðulsjáttan | 87.815 | 89.415 | 1.600 | 1,8% |
| Rakstrarjáttan | 832.545 | 836.155 | 3.610 | 0,4% |
| Lógarbundin játtan | 127.511 | 127.511 | 0 | 0,0% |
| **Tilsamans** | **1.047.871** | **1.053.081** | **5.210** | **0,5%** |

# § 11 Heilsu- og innlendismál

| Játtanarliga støðan í september 2017 | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Høvuðs-konta** | **Stovnur/játtan** | **Játtanarslag** | **Frávik** *(kr.)* | **Viðmerking** |
| 14.1.03. | Útreiðslur av vali | Rakstur | -1.000.000 | Eykajáttan umbiðin í august |
| 20.1.10. | Koppsetingar | Lógarbundin | 500.000 | Eykajáttan umbiðin í august |
| 20.1.19. | Læknakanningar av børnum | Lógarbundin | 100.000 | Eykajáttan umbiðin í august |
| 20.2.04. | Kommunulæknaskipanin | Rakstur | 250.000 | Eykajáttan umbiðin í august |
| 20.3.24. | Sjúklingatrygging | Lógarbundin | 3.500.000 | Eykajáttan umbiðin í august |
| 20.3.30. | Deildin fyri arbeiðs- og almannaheilsu | Rakstur | 100 | Eykajáttan umbiðin í august |
| **Tilsamans** | | | **3.450.000** | |

| Meting av útreiðslum á §11 í 2017 sammett við fíggjarlógina fyri 2017 | | | | |
|---|---|---|---|---|
| *1.000 kr.* | **FL-2017** | **Meting 2017** | **Frávik** | **Frávik (%)** |
| Stuðulsjáttan | 1.745 | 1.745 | 0 | 0,0% |
| Rakstrarjáttan | 1.065.444 | 1.064.794 | -650 | -0,1% |
| Lógarbundin játtan | 6.650 | 10.750 | 4.100 | 61,7% |
| **Tilsamans** | **1.073.839** | **1.077.289** | **3.450** | **0,3%** |

# § 12 Almannamál

| Játtanarliga støðan í september 2017 | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Høvuðs-konta** | **Stovnur/játtan** | **Játtanarslag** | **Frávik** *(kr.)* | **Viðmerking** |
| 21.1.08. | Dugni - skúlin | Rakstur | 200.000 | Eykajáttan samtykt í august |
| 21.3.01. | Barnavernd | Lógarbundin | -300.000 | Eykajáttan umbiðin í august |
| 21.3.09. | Familjuískoyti | Lógarbundin | -2.400.000 | Eykajáttan samtykt í august |
| 21.3.13. | Ættleiðingarstuðul | Lógarbundin | -300.000 | Eykajáttan umbiðin í august |
| 21.4.01. | Dagpeningaskipan | Lógarbundin | -1.000.000 | Eykajáttan umbiðin í august |
| 21.6.09. | Trivnaðartænatur | Rakstur | 2.450.000 | Eykajáttan samtykt í august + eykajáttan umbiðin í august |
| 21.7.01. | Vanlig forsorg | Lógarbundin | 7.500.000 | Eykajáttan umbiðin í august |
| 21.7.02. | Arbeiðsfremjandi tiltøk | Lógarbundin | 5.600.000 | Eykajáttan umbiðin í august |
| 21.8.01. | Fólkapensjón | Lógarbundin | 8.000.000 | Eykajáttan umbiðin í august |
| 21.8.05. | Fyritíðarpensjón | Lógarbundin | -3.600.000 | Eykajáttan umbiðin í august |
| 34.4.04. | Sjúkratrygd | Lógarbundin | -130.000 | Eykajáttan umbiðin í august |
| **Tilsamans** | | | **16.020.000** | |

**Meting av útreiðslum á § 12 í 2017 samanborið við fíggjarlógina fyri 2017**

| *1.000 kr.* | **FL-2017** | **Meting 2017** | **Frávik** | **Frávik (%)** |
|---|---|---|---|---|
| Stuðulsjáttan | 14.599 | 14.599 | 0 | 0,0% |
| Rakstrarjáttan | 387.508 | 390.158 | 2.650 | 0,7% |
| Lógarbundin játtan | 1.052.179 | 1.065.549 | 13.370 | 1,3% |
| **Tilsamans** | **1.454.286** | **1.470.306** | **16.020** | **1,1%** |

# § 13 Uttanríkis- og vinnumál

| **Játtanarliga støðan í september 2017** | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Høvuðs-konta** | **Stovnur/játtan** | **Játtanarslag** | **Frávik** *(kr.)* | **Viðmerking** |
| 11.1.59. | Uttanríkis- og vinnumálaráðið | Rakstur | 850.000 | Eykajáttan umbiðin í august |
| 13.3.02. | Neyðhjálp | Stuðul | 507.000 | Eykajáttan umbiðin í august |
| 13.3.04. | Menningarsamstarv | Stuðul | -507.000 | Eykajáttan umbiðin í august |
| 36.1.04. | Havbúnaðarroyndir | Stuðul | 15.000.000 | Fíggjarnevndarskjal samtykt í juni + Eykajáttan umbiðin í august |
| 37.2.04. | Endurgjald til skipasmíð | Stuðul | 22.938.000 | Eykajáttan samtykt í august + eykajáttan umbiðin í august |
| **Tilsamans** | | | **38.788.000** | |

| **Meting av útreiðslum á §13 í 2017 samanborið við fíggjarlógina fyri 2017** | | | | |
|---|---|---|---|---|
| *1.000 kr.* | **FL-2017** | **Meting 2017** | **Frávik** | **Frávik (%)** |
| Stuðulsjáttan | 42.675 | 80.613 | 37.938 | 74,8% |
| Rakstrarjáttan | 60.867 | 61.717 | 850 | 1,4% |
| Lógarbundin játtan | 0 | 0 | 0 | 0,0% |
| **Tilsamans** | **103.542** | **142.330** | **38.788** | **37,5%** |

# § 17 Samferðslumál

| Játtanarliga støðan í september 2017 | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Høvuðs-konta** | **Stovnur/játtan** | **Játtanarslag** | **Frávik** *(kr.)* | **Viðmerking** |
| 38.1.02. | Landsverk | Rakstur | 2.300.000 | Eykajáttan umbiðin í august |
| 38.1.21. | Stuðul til havnir | Stuðul | 200.000 | Eykajáttan umbiðin í august |
| 38.2.21. | Stuðul til útoyggjar | Stuðul | 500.000 | Eykajáttan umbiðin í august |
| **Tilsamans** | | | **3.000.000** | |

| Meting av útreiðslum á §17 í 2017 samanborið við fíggjarlógina fyri 2017 | | | | |
|---|---|---|---|---|
| *1.000 kr.* | **FL-2016** | **Meting 2017** | **Frávik** | **Frávik (%)** |
| Stuðulsjáttan | 38.400 | 39.100 | 700 | 1,8% |
| Rakstrarjáttan | 231.434 | 233.734 | 2.300 | 1,0% |
| Lógarbundin játtan | 0 | 0 | 0 | 0,0% |
| **Tilsamans** | **269.834** | **272.834** | **3.000** | **1,1%** |

# § 20 Inntøkur

| Játtanarliga støðan í september 2017 | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Høvuðs-konta** | **Stovnur/játtan** | **Játtanarslag** | **Frávik** *(kr.)* | **Viðmerking** |
| 50.2.10. | Útgoldið yvirskot frá Danmarks Nationalbank | Ógreinað | -800.000 | Nýggj meting |
| 52.1.01. | Vanligur landsskattur | Ógreinað | 20.000.000 | Nýggj meting |
| 52.1.07. | Felagsskattur | Ógreinað | 125.000.000 | Nýggj meting |
| 52.1.11. | Kapitalvinningsskattur | Ógreinað | 36.000.000 | Nýggj meting |
| 52.1.13. | Avgjald av kapitaleftirlønum | Ógreinað | -18.000.000 | Nýggj meting |
| 52.1.25. | Arvavgjald | Ógreinað | 1.500.000 | Nýggj meting |
| 52.2.01. | Meirvirðisgjald | Ógreinað | 50.000.000 | Nýggj meting |
| 52.2.04. | Tollavgjøld | Ógreinað | 8.000.000 | Nýggj meting |
| 52.2.07. | Punktgjøld | Ógreinað | 10.000.000 | Nýggj meting |
| 52.2.13. | Brennioljugjald | Ógreinað | -3.000.000 | Nýggj meting |
| 52.2.14. | Loyvisgjald á alivinnu | Ógreinað | 47.000.000 | Nýggj meting |
| 52.2.15. | Avgjald á fiskatilfeingi | Ógreinað | 75.000.000 | Nýggj meting |
| 52.2.16. | Framleiðsluavgjøld | Ógreinað | -2.000.000 | Nýggj meting |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 52.2.19. | Skrásetingargjald | Ógreinað | -5.000.000 | Nýggj meting |
| 52.2.22. | Vegskattur | Ógreinað | 5.000.000 | Nýggj meting |
| 52.2.25. | Ferðaavgjald | Ógreinað | 1.000.000 | Nýggj meting |
| 52.2.28. | Umhvørvisgjald á smyrjiolju | Ógreinað | -750.000 | Nýggj meting |
| 52.2.30. | Tinglýsingargjald | Ógreinað | 2.000.000 | Nýggj meting |
| 52.3.01. | Útluting úr Fíggingargrunninum | Ógreinað | 93.000.000 | Nýggj meting + Eykajáttan umbiðin í august |
| 52.3.04. | Útluting frá partafeløgum og grunnum | Ógreinað | -10.000.000 | Nýggj meting |
| 52.5.01. | Endurrindan av keyps-MVG | Ógreinað | 10.000.000 | Nýggj meting |
| 52.5.04. | Endurrindan av DIS/FAS-innt. | Ógreinað | 1.000.000 | Nýggj meting |
| **Tilsamans** | | | **444.950.000** | |

## Løgujáttanareftirlit í fíggjarárinum 2017

Løgukarmurin í fíggjarlógini fyri 2017 er 212,7 mió. kr. tilsamans. Hetta er uttan játtanirnar til felagið P/F Eystur- og Sandoyartunlar og Talgildu Føroyar, sum eftir játtanarskipanini eru ávikavist stuðuls- og rakstrarjáttan í 2017. Harafturat eru 61,5 mió. kr. fluttar frá undanfarnum árum, og eykajáttanir eru samtyktar og umbidnar fyri tilsamans 52,5 mió. kr. Samlaðu játtanirnar til løgur í 2017 við framfluttum játtanum og eykajáttanum verða sostatt væntandi 326,7 mió. kr. í 2017.

Roknast kann við, at um 347 mió. kr. netto verða nýttar av løgujáttanunum í 2017. Tað kann vera torført at meta um nýtsluna av løgujáttanum fyri alt árið, og metingarnar skulu tí lesast við fyrivarni.

| *Heiti (1.000 kr.)* | **Flutt frá eldri árum** | **FL 2017** | **EyJ 2017** | **Játtan tilsamans 2017** | **Mett nýtsla 2017** | **Mett flyting til 2018** |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **§ 1 Løgtingið** | **0** | **0** | **0** | **0** | **0** | **0** |
| **§ 2 Løgmansfyrisitingin** | **0** | **1.800** | **2.300** | **4.100** | **4.100** | **0** |
| Umbygging í Tinganesi | 0 | 1.800 | 2.300* | 4.100 | 4.100 | 0 |
| **§ 3 Fíggjarmál*** ** | **0** | **0** | **0** | **0** | **0** | **0** |
| **§ 5 Fiskivinnumál** | **9.530** | **11.000** | **0** | **20.530** | **18.500** | **2.030** |
| Tilbúgvingarætlan | 0 | 1.500 | 0 | 1.500 | 1.500 | 0 |
| Nýtt havrannsóknarskip | 9.530 | 9.500 | 0 | 19.030 | 17.000 | 2.030 |
| **§ 7 Mentamál** | **8.400** | **105.785** | **50.000** | **164.185** | **160.175** | **4.010** |
| Skúladepil við Marknagil | 3.890 | 95.000 | 50.000* | 148.890 | 148.890 | 0 |
| Fróðskaparsetur Føroya | 0 | 8.000 | 0 | 8.000 | 8.000 | 0 |
| Tjóðleikhús | 4.510 | 0 | 0 | 4.510 | 500 | 4.010 |
| Hvalastøðin við Áir | 0 | 1.000 | 0 | 1.000 | 1.000 | 0 |
| Kirkjubømúrurin | 0 | 1.300 | 0 | 1.300 | 1.300 | 0 |
| Ítróttarhøll á Sandoynni | 0 | 485 | 0 | 485 | 485 | 0 |

*framhald...*

*...framhald*

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **§ 11 Heilsu- og innlendismál** | **21.170** | **67.500** | **0** | **88.670** | **88.670** | **0** |
| Medicoteknisk tól | 0 | 9.000 | 0 | 9.000 | 9.000 | 0 |
| Landssjúkrahúsið, útbygging | 21.170 | 56.000 | 0 | 77.170 | 77.170 | 0 |
| Klaksvíkar sjúkrahús | 0 | 1.500 | 0 | 1.500 | 1.500 | 0 |
| Suðuroyar sjúkrahús | 0 | 1.000 | 0 | 1.000 | 1.000 | 0 |
| | | | | | | |
| **§ 12 Almannamál** | **13.869** | **12.000** | **0** | **25.869** | **16.000** | **9.869** |
| Bústovnar o.a. | 13.869 | 12.000 | 0 | 25.869 | 16.000 | 9.869 |
| | | | | | | |
| **§ 13 Uttanríkis- og vinnumál** | **0** | **0** | **0** | **0** | **0** | **0** |
| | | | | | | |
| **§ 17 Samferðslumál****** | **8.574** | **14.600** | **200** | **23.374** | **59.374** | **0** |
| Umvæling av almennum bygningum | 0 | 21.000 | 0 | 21.000 | 21.000 | 0 |
| Almennir bygningar, søla | 0 | -43.000 | 0 | -43.000 | -7.000 | 0 |
| Nýggir landsvegir | 7.628 | 11.000 | -3.000* | 15.628 | 15.628 | 0 |
| Havnir | 0 | 3.100 | 1.200** | 4.300 | 4.300 | 0 |
| Strandfaraskip landsins | 946 | 22.500 | 0 | 23.446 | 23.446 | 0 |
| Landsins ognir | 0 | 0 | 2.000* | 2.000 | 2.000 | 0 |
| | | | | | | |
| **Løgujáttanir tilsamans** | **61.543** | **212.685** | **52.500** | **326.728** | **346.819** | **15.909** |

Viðmerkingar:
* Eykajáttan umbiðin í august 2017.
** Eykajáttan við fíggjarnevndarskjali í juli 2017.
*** Játtanin til Talgildu Føroyar er rakstrarjáttan undir grein 3 í 2017.
**** Játtanin til felagið P/F Eystur- og Sandoyartunlar er stuðulsjáttan undir grein 17 í 2017.